# Ársferðatrygd
## tryggingartreytir

TRYGD

nr. 7-16
Januar 2021

www.trygd.fo

# Innihaldsyvirlit

**Tryggingartreytir fyri Ferðatrygd**
**Ískoyti til galdandi innbústrygging hjá Trygd**


| | | Síða |
|---|---|---|
| I | | 4 |
| 1 | Nøkur orð um tína ferðatrygging | 4 |
| 2 | Endurgjaldsyvirlit | 5 |
| 3 | Felagstreytir | 7 |
| 3.1 | Hvør er tryggjaður? | 7 |
| 3.2 | Hvørjar ferðir fevnir tryggingin um? | 7 |
| 3.3 | Hvørjar ferðir fevnir tryggingin ikki um? | 7 |
| 3.4 | Nær tekur tryggingin við? | 7 |
| 3.5 | Gjald og prístalsviðgerð | 7 |
| 3.6 | Uppsøgn | 7 |
| 3.7 | Váðabroyting | 7 |
| 3.8 | Kærunevnd | 7 |
| 3.9 | Iðranarrættur | 7 |
| 3.10 | Lóggáva | 8 |
| 3.11 | Treyt fyri fulnaði | 8 |
| 3.12 | Tryggingarupphædd | 8 |
| 3.13 | Skeivar upplýsingar | 8 |
| 3.14 | Dupulttrygging | 8 |
| 3.15 | Endurgjaldskravið avhendað | 8 |
| 3.16 | Aftursókn | 8 |
| 3.17 | Tá ið skaði hendir | 8 |
| 3.18 | Varnating | 9 |
| 4 | Sjúka | 9 |
| 4.6 | Skeiv læknaviðgerð | 10 |
| 5 | Heimflutningur | 10 |
| 6 | Boðsending/fylgi við sjúklingi | 10 |
| 7 | Ferðaslit | 11 |
| 8 | Álop | 12 |
| 9 | Vanlukka | 12 |
| 9.2 | Avlamni | 12 |
| 9.3 | Andlát | 13 |
| 9.4 | Tannskaði | 13 |
| 10 | Privatábyrgd | 13 |
| 11 | Rættarhjálp og akfarsrættarhjálp | 13 |
| 12 | Endurgjald í sambandi við frítíðarferð | 14 |
| 13 | Seinkað viðføri | 14 |
| 14 | Ferðaskjøl | 15 |
| 15 | Ov seint framkomin á ferðini uttanlands | 15 |
| 16 | Ferðin úr Føroyum ella til Føroya seinkað | 15 |
| 17 | Frítíðaríbúðartrygging | 15 |
| 18 | Persónlig trygd | 15 |
| 18.1 | Kreppuhjálp á staðnum | 15 |
| 18.2 | Kreppuhjálp til avvarðandi umvegis telefon | 16 |
| 18.3 | Kreppuhjálp eftir heimkomu | 16 |
| 19 | Evakuering | 16 |
| 20 | Leiting og bjarging | 16 |
| 21 | Yvirgangur | 17 |
| 22 | Gíslatøka | 17 |
| 23 | Tryggjaði afturhildin í sambandi við kríggj | 17 |
| 24 | Ítróttur | 17 |
| 25 | Leigubilur undan fráferð | 17 |
| 26 | Sjálvsábyrgd í sambandi við leigu av motorakfari uttanlands | 17 |
| 27 | Ársavlýsingartrygging | 18 |
| | Orðalisti/Hugtøk | 19 |
| II | Hvat geri eg um...? | 20 |
| III | Leiðbeining til læknar á enskum, týskum, sponskum og fronskum | 23 |

# I.

# 1. Nøkur orð um tína ferðatrygging

## Tryggingin er eitt ískoyti til tína innbústrygging hjá Trygd.

Tað er ein treyt, at tú hevur bústað í Føroyum, og at ferðin byrjar við fráferð úr Føroyum.

Tú kanst velja millum tvey ymisk landafrøðilig øki:

**a. Evropa íroknað Norðurlond og Stóra Bretland.** Landafrøðiliga Evropa eystur móti Ural, Asia og Afrika fram at Miðjarðarhavi, Jordan, Kanariuoyggjar, Madeira, Azorurnar og Írland.

**b. Allur Heimurin:** Lond, ið ikki eru nevnd undir Norðurlond/ Stóra Bretland og Evropa.

Á tryggingarskjalinum er tilskilað, hvat økið tryggingin fevnir um. Sí nærri útgreining yvir landafrøðiligu økini á heimasíðu okkara www.trygd.fo

**Hevur tú brúk fyri bráðfeingishjálp á ferðini, ring so til:**

**Trygd Emergency Centre**
Telefon: +45 44 25 81 00
Telefax: +45 33 15 60 61

**SVARAR ALT SAMDØGRIÐ**

**Hjálp á staðnum, læknavakt alt samdøgrið**

Á ferðini kanst tú seta teg í samband við læknar hjá **Trygd Emergency Centre** alt samdøgrið í sambandi við bæði álvarsliga og minni álvarsliga sjúku. Tú kanst fáa ráð og leiðbeining um læknaviðgerð, um útskrivaðan heilivág av viðgerandi lækna, umframt um egnaðar læknar og tannlæknar uttanlands. Tó fevnir ferðatryggingin ikki um útreiðslur í hesum sambandi.

Verður tú fyri stuldri, álopi, herverki o.l., skal hetta beinanvegin fráboðast løgregluni á staðnum.

Minst til at fáa váttan fyri fráboðan ella løgreglufrágreiðing heim við.

Verður tú sjúkur, fyri *vanlukku* o.l., skal hetta fráboðast læknanum á staðnum. Minst til at fáa nágreiniliga lýsta læknaváttan o.l. heim við.

Øll krøv mótvegis Trygd skulu skjalprógvast.

## Orðalisti/hugtøk

Á síðu 19 í hesum treytum sært tú frágreiðingar um ymisk heiti og máliskur, sum nevnd eru í treytunum. Heitini ella máliskurnar eru skrivaði í *kursiv.*

## 2. Endurgjaldsyvirlit

| Grein | Tryggingarhædd fyri hvønn ferðandi | Norðurlond, Stórabretland og Evropa | Allur heimurin |
|---|---|---|---|
| 4 | Sjúka | Seravtala grein 4.1/Óavmarkað | Óavmarkað |
| 4.3.f | Telefonnýtsla | Upp til 1.000 | Upp til 1.000 |
| 4.3.g | Leigu av sjónvarpi, teldu o.ø. | 1.000 um vikuna, tó í mesta lagi 3.000 | 1.000 um vikuna, tó í mesta lagi 3.000 |
| 4.3.h | Hýruvognur | Í mesta lagi 1.000 | Í mesta lagi 1.000 |
| 4.3.l | Fysioterapi v.m. | Í mesta lagi 20.000 | Í mesta lagi 20.000 |
| 4.3.m | Tannlæknaviðgerð | Í mesta lagi 15.000 | Í mesta lagi 15.000 |
| 4.4.a | Uppihald og mat á hotelli í sambandi við ambulanta viðgerð | Í mesta lagi 1.500 um dagin | Í mesta lagi 1.500 um dagin |
| 4.4.b | Uppihald og mat á hotelli eftir viðgerð | Í mesta lagi 1.500 um dagin | Í mesta lagi 1.500 um dagin |
| 4.6 | Skeiv læknaviðgerð | Í mesta lagi 1.000.000 | Í mesta lagi 1.000.000 |
| 5 | Heimflutningur | Óavmarkað | Óavmarkað |
| 6 | Boðsending/fylgi við sjúklingi | Í mesta lagi 3 persónar<br>Vistarhald: 1.500 pr. dag fyri hvønn<br>Matur og flutningur: 500 pr. dag fyri hvønn | Í mesta lagi 3 persónar<br>Vistarhald: 1.500 pr. dag fyri hvønn<br>Matur og flutningur: 500 pr. dag fyri hvønn |
| 7 | Ferðaslit | Óavmarkað | Óavmarkað |
| 7.2 | Heimflutningur av bili | Upp til 30.000 | Upp til 30.000 |
| 8 | Álop | Í mesta lagi 600.000 | Í mesta lagi 600.000 |
| 9 | Vanlukka | Deyð: 200.000/Avlamni: 400.000<br>Børn undir 18 ár: Deyð: 25.000<br>Tannskaðar: 15.000 | Deyð: 200.000/Avlamni: 400.000<br>Børn undir 18 ár: Deyð 25.000<br>Tannskaðar: 15.000 |
| 10 | Privatábyrgd | Persónsskaðar: 10.000.000<br>Skaðar á lutir: 5.000.000<br>Sjálvsábyrgd: 500 | Persónsskaðar: 10.000.000<br>Skaðar á lutir: 5.000.000<br>Sjálvsábyrgd: 500 |
| 11 | Rættarhjálp | Í mesta lagi 200.000<br>Sjálvsábyrgd: 10/20%, min. 2.500/5.000 | Í mesta lagi 200.000<br>Sjálvsábyrgd: 10/20%, min. 2.500/5.000 |
| 12 | Mistir ferðadagar | Óavmarkað | Óavmarkað |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 13.1, nr.1 | Virkin skaðahjálp | 10% av tryggingarupphæddini fyri innbúgv, tó í mesta lagi 15.000. | 10% av tryggingarupphæddini fyri innbúgv, tó í mesta lagi 15.000. |
| 13.1, nr. 2 og 3 | Seinkað viðføri | Endurgjaldskeyp: 1.200 pr. persón/dag, í mesta lagi 4.800 pr. persón og 9.600 fyri øll ferðandi pr. hending<br><br>Leiga av útgerð: 3.000 pr. persón, í mesta lagi 6.000 fyri øll ferðandi pr. hending | Endurgjaldskeyp: 1.200 pr. persón/dag, í mesta lagi 4.800 pr. persón og 9.600 fyri øll ferðandi pr. hending<br><br>Leiga av útgerð: 3.000 pr. persón, í mesta lagi 6.000 fyri øll ferðandi pr. hending |
| 14 | Ferðaskjøl | Upp til 2.500 | Upp til 2.500 |
| 15 | Ov seint framkomin á ferðini uttanlands | At fullføra ferðina: Óavmarkað<br>Vistarhald: 1.500 pr. dag<br>Matur og flutningur: 500 pr. dag | At fullføra ferðina: Óavmarkað<br>Vistarhald: 1.500 pr. dag<br>Matur og flutningur: 500 pr. dag |
| 16 | Ferðin úr Føroyum ella til Føroya seinkað | 1.000 pr. dag, tó í mesta lagi 4.000 | 1.000 pr. dag, tó í mesta lagi 4.000 |
| 17 | Frítíðaríbúðartrygging | Í mesta lagi 25.000 pr. ferð | Í mesta lagi 25.000 pr. ferð |
| 18.1 | Kreppuhjálp á staðnum | Óavmarkað | Óavmarkað |
| 18.2 | Kreppuhjálp til avvarðandi umvegis telefon | Óavmarkað | Óavmarkað |
| 18.3 | Kreppuhjálp eftir heimkomu | Í mesta lagi 10.000 | Í mesta lagi 10.000 |
| 19 | Evakuering | Flutningsútreiðslur: 50.000<br>Eykaútreiðslur: 15.000 | Flutningsútreiðslur: 50.000<br>Eykaútreiðslur: 15.000 |
| 20 | Leiting og bjarging | Upp til 100.000, tó í mesta lagi 300.000 uttan mun til nøgd av teknaðum tryggingum | Upp til 100.000, tó í mesta lagi 300.000 uttan mun til nøgd av teknaðum tryggingum |
| 21 | Yvirgangur | Óavmarkað | Óavmarkað |
| 22 | Gíslatøka | Flutningsútreiðslur: Óavmarkað<br>Eykaútreiðslur: 15.000 | Flutningsútreiðslur: Óavmarkað<br>Eykaútreiðslur: 15.000 |
| 23 | Afturhildin í sambandi við kríggj | Uppihald og innanríkisflutning: Í mesta lagi 50.000<br>Matur: 500 um dagin | Uppihald og innanríkisflutning: Í mesta lagi 50.000<br>Matur: 500 um dagin |
| 24 | Ítróttur | Í mesta lagi kr. 3.000 | Í mesta lagi kr. 3.000 |
| 25 | Leigubilur undan fráferð | Óavmarkað | Óavmarkað |
| 26 | Sjálvsábyrgd í sambandi við leigu av motorakfari uttanlands | Óavmarkað | Óavmarkað |
| 27 | Avlýsing | Upp til 60.000 | Upp til 60.000 |

**Upphæddirnar eru allar í donskum krónum.**
**Sí nærri frágreiðing og avmarkingar í endurgjaldinum undir nevndu greinum.**

## 3. Felagstreytir

### 3.1 Hvør er tryggjaður?

3.1.1 Tryggingin fevnir um somu persónar sum innbústryggingin hjá Trygd, tó við undantaki av møguligum hjálparfólki í húsarhaldinum.

3.1.2 Ógift børn undir 21 ár, ið fyribils búgva uttanlands, t.d. eru á eftir- og háskúla, eru somuleiðis umfataði av tryggingini, tá tey eru á ferð við skúlanum.

3.1.2.1 Tað er tó ein treyt, at barnið ikki livir í føstum parlagi ella hevur fastbúgvandi børn hjá sær.

### 3.2 Hvørjar ferðir fevnir tryggingin um?

3.2.1 Tryggingin fevnir um privatar frítíðarferðir, íroknað lestrarferðir og lestrarørindi.

3.2.1.1 Eisini fevnir tryggingin um frítíðarferðir saman við vinnuørindum - tó eru dagarnir, sum tú ert í vinnuørindum, ikki umfataðir av hesi trygging.

3.2.2 Hvør einstøk ferð kann vara í upp til 60 dagar.

### 3.3 Hvørjar ferðir fevnir tryggingin ikki um?

3.3.1 Tryggingin fevnir ikki um vinnuferðir. Er talan um frítíðarferð saman við vinnuørindum, eru dagarnir, sum tú ert í vinnuørindum, **ikki** umfataðir av tryggingini.

### 3.4 Nær tekur tryggingin við?

3.4.1 Tryggingin tekur við frá tí løtu, tú fert úr bústaði tínum í Føroyum - ella frá tí degi, tryggingin er teknað, um tú tryggjar teg seinni - og heldur uppat, tá tú ert aftur við hús í Føroyum, tó í mesta lagi 60 dagar.

3.4.2 Er heimkoman seinkað, men ikki av egnum ávum, verður tryggingartíðin longd við 14 døgum. Eykagjald verður ikki kravt.

### 3.5 Gjald og prístalsviðgerð

3.5.1 Víst verður til innbústryggingina hjá Trygd.

### 3.6 Uppsøgn

3.6.1 Ferðatryggingin skal í minsta lagi verða í gildi í 1 ár, áðrenn hon kann sigast upp ella broytast frá at umfata allan heimin til bert at umfata Evropa íroknað Norðurlond og Stóra Bretland.

3.6.2 Ynskir tryggingartakari at broyta landafrøðiliga økið frá Evropa íroknað Norðurlond og Stóra Bretland til at umfata allan heimin, kann hetta gerast beinanvegin við at geva Trygd fráboðan um hettar.

### 3.7 Váðabroyting

3.7.1 Ferðatryggingin fevnir um 2 landafrøðilig øki, sí grein 1. Tað er tí serliga umráðandi, at tryggjaði, áðrenn ferðin byrjar, kannar eftir, um tryggingin umfatar tað økið, ferðast verður til.

3.7.2 Vísur tað seg í skaðastøðu, at tryggjaði er í landi, ið ikki er umfatað av tryggingarfulnaðinum, verður onki endurgjald latið.

### 3.8 Kærunevnd

3.8.1 Um tryggjaði ikki er nøgdur við viðgerðina hjá Trygd, kann verða kært til:

**Ankenævnet for Forsikring**
Anker Heegaards Gade 2
1572 København V

Tel. +45 33 15 89 00

3.8.2 Kærunevndin kann tó bert viðgera kæruna, um:

**1**. tryggjaði til fánýtis hevur roynt at fingið eina nøktandi avtalu við Trygd,

**2**. Trygd ikki innan 3 vikur hevur svarað eini skrivligari áheitan frá tryggjaða,

**3**. tryggjaði rindar kærunevndini eitt gjald, sum kærunevndin ásetur.

3.8.3 Gjaldið verður goldið aftur, um tryggjaði fær fult ella lutvíst viðhald í kæruni, um kæran verður víst burtur, ella um tryggjaði sjálvur tekur kæruna aftur.

3.8.4 Kæran skal sendast kærunevndini á einum oyðiblaði, sum fæst við at ringja til:

**P/F Trygd Tryggingarfelag**
Oknarvegur 5
Postboks 44
110 Tórshavn
Tel. +298 35 81 00

**Forsikringsoplysningen**
Amaliegade 10
1256 København K
Tel. +45 33 43 55 00

**Ankenævnet for Forsikring**
Anker Heegaards Gade 2
1572 København V
Tel. +45 33 15 89 00

Kæruoyðiblaðið fæst eisini á heimasíðuni hjá Trygd www.trygd.fo

### 3.9 Iðranarrættur

3.9.1 Tú kanst angra keypið av hesi trygging.

3.9.2 Iðranarfreistin er 14 dagar. Freistin gongur frá tí degi, tú hevur fingið fráboðan um, at tryggingin er teknað. Freistin er tó í fyrsta lagi galdandi frá tí degi, tú á skrift hevur fingið upplýsing um iðranarrættin.

3.9.3 Gongur freistin út ein halgidag, leygardag, sunnudag, grundlógardag, jólaaftan ella nýggjársdag, verður freistin longd til næsta gerandisdag.

3.9.4 Um tú ynskir at angra keypið av tryggingini, skalt tú boða Trygd skrivliga frá hesum, áðrenn freistin er úti.

## 3.10 Lóggáva

3.10.1 Fyri tryggingina er annars „Lóg um tryggingaravtalur" galdandi.

## 3.11 Treyt fyri fulnaði

Ferðatryggingin skal vera keypt og goldin innan fráferð úr Føroyum.

3.11.1 **Fulnaðarøki**

**a)** Ferðatryggingin fevnir bert um tey landafrøðiligu øki, ið eru tilskilað í tryggingarskjalinum.
**b)** Endurgjald verður veitt fyri hendingar, ið henda í tryggingartíðarskeiðinum.
**c)** Tryggingin tekur við tann dagin, ið er tilskilaður í tryggingarskjalinum. Tryggingin verður teknað fyri eitt 1 ára skeið, og verður endurnýggjað við rindan av tryggingargjaldi fyri komandi tryggingarár.

3.11.2 **Vanlig undantøk**

Ferðatryggingin veitir **ikki** endurgjald fyri:
**a)** Krøv, ið eru orsakað av at tú hevur elvt til tryggingartilburðin við vilja ella grovum ósketni, í fyllskapi, undir ávirkan av rúsevni, heilivági ella øðrum euforiserandi evnum, uttan so at tað kann gerast sannlíkt, at *skaðin* ikki hevur samband við hetta,
**b)** krøv, ið eru orsakað av at tú hevur luttikið í *vísindaligum rannsóknarferðum*, útint ella vant *yrkisítrótt*,
**c)** óbeinleiðis tap
**d)** flogskiparar og stýrimenn undir flúgving,
**e)** krøv, ið eru beinleiðis ella óbeinleiðis orsakað av verkfalli, verkbanni, arrest, haldi ella øðrum átøkum, framd av almennum myndugleika. Sí tó grein **11.1 e**, og **7.1 b**,
**f)** einhvørja útreiðslu eftir heimkomu til Føroya. Sí tó grein **18.3**,
**g)** skaða, ið er beinleiðis ella óbeinleiðis avleiðing av kríggi, krígslíkum atgerðum, uppreistri ella borgaraófriði. Tó veitir ferðatryggingin endurgjald fyri skaða, til fyrsti møguleiki fyri evakuering er til staðar, um evakuering ikki longu var tilrádd ella framd orsakað av ófriði í økinum, tá tú kom inn í viðkomandi øki,
**h)** virknari luttøku í kríggi, uppreistri e.l.,
**i)** skaða, ið er beinleiðis ella óbeinleiðis avleiðing av kjarnorku, geislavirknum evnum, brennievni ella burturkasti,
**j)** force majeure, t.d. øskuskýggj.
**k)** tap í sambandi við húsagang hjá flogfelagi, ferðaskrivstovu o.l. (víst verður í hesum sambandi til Rejsegarantifonden)

## 3.12 Tryggingarupphædd

Um ikki annað er tilskilað fyri einstakan fulnað og partfulnað, eru tryggingarupphæddirnar í **Endurgjaldsyvirlitinum** hægsta mark fyri okkara endurgjaldsskyldu fyri allar skaðar, ið henda undir teimum einstøku fulnaðunum í tryggingartíðarskeiðinum.

3.12.1 Tryggingarupphæddirnar eru fyri hvønn tryggjaðan, um annað ikki er tilskilað fyri einstaka fulnaðin.

## 3.13 Skeivar upplýsingar

Tað er av stórum týdningi, at allar upplýsingar eru nágreiniligar og rættar. Um tú hevur dult ella givið skeivar upplýsingar, ið kunnu hava týdning fyri okkara metan, kann endurgjaldið lækkað ella fella burtur.

## 3.14 Dupulttrygging

Ferðatryggingin fevnir ikki um endurgjaldskrøv, ið eru fevnd av aðrari trygging. Tó verður avlamnis- og deyðsendurgjald, ið kemur undir grein **9. Vanlukka**, ikki avmarkað av aðrari keyptari trygging. Tá ið *skaði* hendir, skalt tú altíð upplýsa, um tú hevur trygging í øðrum felag.

3.14.1 **Insurance in other companies (Coinsurance)**

If, at the time the loss or damage insured by this certificate shall occur, there is any other insurance against such loss or damage or any part thereof, the underwriter shall be liable under this certificate for its proportionate share of loss or damage only. **(Kemur í nýtslu, tá málið skal avgerast eftir útlendskum rætti)**

## 3.15 Endurgjaldskravið avhendað

Tú kanst ikki veðseta ella avhenda rættindi tíni móti Trygd uttan at hava fingið samtykki felagsins.

3.15.1 You cannot, without consent from Trygd, pledge or assign your rights according to the travel insurance. **(Kemur í nýtslu, tá málið skal avgerast eftir útlendskum rætti)**

## 3.16 Aftursókn

Tá endurgjald verður veitt sambært ferðatryggingini, yvirtekur Trygd øll tíni rættindi í málinum.

3.16.1 **Rights of subrogation**

The underwriter shall be fully and completely subrogated to the rights of the Insured against parties who may be liable to provide an indemnity or make a contribution with respect to any matter which is the subject of a claim under this certificate. The underwriter may at his own expense take over the Insured's rights against third parties to the extent of his payment made. The Insured shall cooperate with the underwriter and provide such information and documentation reasonably required by the underwriter in order to collect and enforce his rights of subrogation. The underwriter may institute any proceedings at his own expense against such third parties in the name of the Insured. **(Kemur í nýtslu, tá málið skal avgerast eftir útlendskum rætti)**

## 3.17 Tá ið skaði hendir

**a)** Tú hevur skyldu til at geva Trygd allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at støða kann verða tikin til, um *skaðin* er fulnaðarheimilaður og í hvønn mun. Tað verið seg løgreglufrágreiðingar, frágreiðingar frá 3. parti, t.d. ferðaleiðara, starvsfólki á hotelli, lækna/sjúkrahúsi e.ø. viðkomandi persónum. **Sí eisini II, "Hvat geri eg, um ... ?"**

**b)** Okkara *lækni* hevur rætt til at útvega sær upplýsingar um tína heilsustøðu og viðgerð hjá egnum lækna, eins væl og hjá øðrum læknum og/ella sjúkrahúsum, har tú hevur fingið viðgerð, og um neyðugt tosa við tey um viðurskiftini. Alt hetta fer fram í trúnaði.

**c)** Vit hava rætt til at krevja, at tú letur teg kanna (herundir at lata blóðroynd) av okkara lækna ella av lækna, sum vit hava valt. Í sambandi við andlát hava vit rætt til at krevja líkskurð. Útreiðslur fyri hetta verða rindaðar av Trygd. Um líkskurður ikki verður gjørdur, hóast vit hava biðið um tað, kann rætturin til endurgjald fella burtur.

**d)** Tú hevur skyldu til at senda okkum skjalprógv fyri útreiðslur ella skaðar, sum endurgjald verður kravt fyri, t.d. upprunakeypskvittanir, garanti, løgreglufrágreiðing, frágreiðing frá flutningsfelag, lækna/sjúkrahúsi o.t.

**e)** Fyriskipan av flutningi kann vera avmarkað í londum, har tað er kríggj e.l. Vit hava ikki ábyrgd av, at flutningur kann fara fram, men vilja samstarva við Uttanríkismálaráðið, um tørvur er á hjálp.

**f)** Um flutningur ikki verður fyriskipaður av okkum, verður endurgjald í mesta lagi veitt fyri ta upphædd, sum líknandi flutningur hevði kostað, um hann var fyriskipaður av okkum. Endurgjaldið er avmarkað til kostnaðin fyri flogferðaseðil á vanligari flogleið á bíligasta flokki, sí tó grein **15.2 a)**

**g)** Endurgjald verður goldið tá vit hava móttikið neyðugar upplýsingar fyri at kunna áseta okkara endurgjaldsskyldu. Kann tryggingartakarin ikki lata Trygd skjalprógv fyri kravdum útreiðslum, sí omanfyri **a)** til **f),** kann rætturin til endurgjald avmarkast ella fella burtur.

**h)** Í sambandi við fráboðan av skaða, hava bæði tú og Trygd rætt til at strika ferðatryggingina við 14 daga ávaring. Hetta skal verða gjørt innan 14 dagar eftir at *skaði* er goldin ella avvístur. Um tryggingin verður strikað av tær, verður einki tryggingargjald endurrindað.

## 3.18 Varnarting

Rættarmál móti Trygd skal fremjast við Føroya Rætt.

# 4. Sjúka

4.1 Ferðatryggingin er eitt ískoyti til fulnað, sum fæst umvegis Heilsutrygd, sambært galdandi Norðurlendskari Samstarvsaftalu og sáttmálanum millum Stóra Bretland og Føroyar, umframt aðrar galdandi konventiónir, avtalur og mannagongdir fyri sjúkraviðgerð og heimflutning.

4.2 Ferðatryggingin veitir endurgjald fyri tað, sum ikki verður endurrindað eftir tí, sum er nevnt í grein 4.1.

4.3 Verður tú *brádliga sjúkur* ella skaddur á ferðini, rindar tryggingin rímiligar og *neyðugar útreiðslur* á staðnum til:

**a)** viðgerð hjá góðkendum lækna á staðnum,
**b)** heilivág eftir læknaráðum,
**c)** sjúkrahúslegu og viðgerð eftir læknaráðum á sjúkrahúsi, herundir skurðviðgerðir,
**d)** veitan av reinsaðum (screenaðum) blóði og vakt á staðnum, so tú fært reinsað blóð. Hetta er treytað av, at okkara *lækni* metir, at tú ert staddur í einum vandaøki,
**e)** trupulleikar í viðgongutíð, føðing, viðgerð av óføddum barni ella barni, ið er ov tíðliga føtt, upp til 4 vikur frammanundan væntaðari føðing. Útreiðslurnar eru fevndar av ferðatryggingini hjá mammuni. Útreiðslurnar í sambandi við viðgerð av óføddum ella ov tíðliga føddum barni eru fevndar av hesum sjúkufulnaði,
**f)** telefonnýtslu, tá tryggjaði er lagdur inn á sjúkrahús, í mesta lagi kr. 1.000.
**g)** Leigu av sjónvarpi, útvarpi og/ella teldu við upp til kr. 1.000 um vikuna – tó í mesta lagi kr. 3.000 íalt,
**h)** hýruvogn til og frá viðgerðarstaði, í mesta lagi kr. 1.000,
**i)** flutning frá sjúku-/vanlukkustaðnum til viðgerðarstaðið. Sjúkraflutningsflogfar/-tyrla skal frammanundan góðkennast av Trygd,
**j)** sjúkraflutning, ið er fylgja av vantandi viðgerðarmøguleika, til næsta hóskiliga viðgerðarstað. Fulnaðurin er treytaður av, at okkara *lækni*, eftir at hava samskift við viðgerandi lækna, metir, at slíkur sjúkraflutningur er neyðugur og fullgóður,
**k)** leingjan av ferðatryggingini, um *heimferðin* verður seinkað longri enn tað tíðarskeið, tryggingin fevnir um.
**l)** viðgerð hjá fysioterapeuti, kiropraktori ella øðrum viðgera, sum ikki er *lækni*. Endurgjaldið kann í mesta lagi verða kr. 20.000.
**m)** viðgerð hjá tannlækna í sambandi við bráðkomna tannapínu/tannskaða. Endurgjaldið kann í mesta lagi verða kr. 15.000.

4.4 Ferðatryggingin fevnir eisini um rímiligar og *neyðugar eykaútreiðslur* til:

**a)** *uppihald* og mat á hotelli, í mesta lagi kr. 1.500 um dagin, um okkara *lækni* metir, at tú kanst fáa ambulanta viðgerð í staðin fyri sjúkrahúslegu,
**b)** *uppihald* og mat á hotelli, í mesta lagi kr. 1.500 um dagin, eftir lokna viðgerð, meðan bíðað verður eftir *heimferð* ella at fáa fatur aftur á ferðalagnum.

4.5 **Ferðatryggingin fevnir ikki um útreiðslur fyri:**

**a)** viðgerð ella *uppihald* eftir at vera komin heim aftur til Føroya
**b)** viðgerð fyri varandi ella verandi sjúkur, sum innan fyri seinastu tveir mánaðirnar undan fráferð, hava havt við sær:
1. sjúkrahúslegu,
2. meting/viðgerð hjá lækna, ið ikki er liður í eftirmeting ella
3. broyting av heilivági

**c)** viðgerð av varandi ella verandi sjúkum, um tú:
1. ikki ert farin til lækna ella hevur sýtt fyri/ert givin við viðgerð fyri sjúkuna, hóast tú átti at vitað ella havt illgruna um, at sjúkan kravdi viðgerð ella var munandi versnað,
2. um tú ert uppgivin ella sýtt er fyri viðgerð
3. er skrivaður upp til, ávístur til ella er á bíðilista til meting/viðgerð,
4. ikki er møttur til avtalaða eftirmeting seinastu 2 mánaðirnar ella orsakað av ikki at hava møtt áður ella hevur uppgivið vanligar viðtalur,

**d)** viðgerð av sjúkum, sum eru ella hava verið kannaðar undan fráferð, eisini hóast sjúkuavgerð ikki er staðfest,
**e)** eftirlit og viðgerð, eisini heilivág, fyri at halda eina varandi ella verandi sjúku støðuga,
**f)** ein undan fráferð kendan viðgerðartørv,
**g)** framhaldandi viðgerð ella *uppihald* um so er, at tú sýtir fyri heimflutningi, tá ið okkara *lækni* hevur gjørt av, at heimflutningur skal fara fram,
**h)** viðgerð ella *uppihald* í tí føri, har okkara *lækni* hevur gjørt av, at viðgerðin kann bíða, til komið er heimaftur til Føroya,
**i)** í sambandi við heimflutning, tú sjálvur hevur fyriskipað, sum ikki hevði verið álagdar okkum, um vit høvdu skipað fyri heimflutninginum,
**j)** flutningi, sum er orsakaður av, at tú óttast smittuvanda,
**k)** tí, ið kemur aftrat, sum avleiðing av, at tú ikki fylgir ávísingunum frá okkara lækna,
**l)** føðing ella sjúkuviðgerð í sambandi við barnsburð seinni enn 4 vikur undan væntaðari føðing
**m)** provokeraða fosturtøku,
**n)** viðgerð ella fylgisjúku av aids, íroknað kanningar av sjúkueyðkennum. Hetta undantakið er galdandi uttan mun til punkt 4.5, a-c,
**o)** at endurgjalda, umvæla ella skifta *protesur*, brillur, kontaktlinsur, hoyritól ella onnur *hjálpitól*,
**p)** afturmenningar- ella kuruppihald,
**q)** tannlæknaviðgerð, um tú ikki hevur fylgt vanligari tannrøkt við í minsta lagi árligum eftirliti og møguligari neyðugari viðgerð.

## 4.6 Skeiv læknaviðgerð

4.6.1 Ferðatryggingin fevnir um varandi mein, ið er fylgja av skjalprógvaðari skeivari læknaligari viðgerð, ið hevur beinleiðis samband við skaða, ið er fulnaðarheimilaður sambært grein **4. Sjúka**.

4.6.2 Endurgjaldsábyrgdin verður ásett sambært vanligum endurgjaldsreglum og endurgjaldsupphæddin verður ásett sambært endurgjaldsábyrgdarlógini.

# 5. Heimflutningur

5.1 Ferðatryggingin er eitt ískoyti til fulnað, sum fæst umvegis Heilsutrygd, umframt galdandi konventiónir, avtalur og mannagongdir fyri sjúkraviðgerð og heimflutning.

5.2 Ferðatryggingin veitir endurgjald fyri tað, sum ikki verður endurrindað eftir tí, sum er nevnt í grein **5.1.** Verður tú *brádliga sjúkur* ella skaddur á ferðini, rindar tryggingin rímiligar og *neyðugar útreiðslur* til:
**a)** heimflutning til bústað/sjúkrahús í Føroyum. Eftir at hava verið í sambandi við viðgerandi lækna, metir okkara *lækni*, um heimflutningur er neyðugur og ráðiligur, og hvat flutningsfar skal nýtast. Trygd ger av, nær heimflutningurin skal fara fram,
**b)** heimflutning til jarðarferðafyriskipara í Føroyum í sambandi við andlát, íroknað lógarkravd tiltøk, t.d. balsamering og zinkkistu, ella kremering og/ella jarðarferð á staðnum, um tey avvarðandi ynskja hetta. Ferðatryggingin fevnir í mesta lagi um tað, heimflutningur hevði kostað,
**c)** heimflutning av týðandi persónligum ognarlutum, sum tú mást lata vera eftir sum fylgja av heimflutningi, góðkendur av okkum,
**d)** hýruvogn ella læknafyriskipaðan sjúkrabil frá sjúkrahúsi ella floghavn til tín bústað í Føroyum, eftir at vit hava flutt teg heim til Føroya.

5.3 Um tú, tá tú ert liðugt viðgjørdur og útskrivaður av sjúkrahúsi uttanlands, ikki hevur verið førur fyri at fylgja ætlaðu og skjalprógvaðu *ferðaleiðini*, og ikki ert fluttur heim fyri okkara rokning, fevnir ferðatryggingin um rímiligar og *neyðugar eykaútreiðslur* til:
**a)** at fáa fatur aftur á fastløgdu *ferðaleiðini*, á bíligasta flokki, til staðið, tú skuldi verið á sambært fastløgdu ferðaleiðini, ella
**b)** *heimferð* til tín bústað í Føroyum, á bíligasta flokki. Um tú hevur fingið *heimferð* til Føroyar, hevur tú ikki rætt til ferð avstað aftur.
**c)** vistarhald á hotelli til tryggjaði fær fatur aftur á ferðalagnum smb. grein **5.3 a)**, tó í mesta lagi kr. 1.500 um dagin. Hetta er tó ikki galdandi, um tryggjaði er heimfluttur til Føroyar.

5.4 Harafturat fevnir tryggingin um heimflutning av børnum undir 18 ár, sum eru við í ferðini og hava ferðatrygging í Trygd, um so er, at foreldur teirra ella fylgdarfólk verða flutt heim, orsakað av sjúku, skaða ella andláti.

5.5 **Ferðatryggingin fevnir ikki um útreiðslur til**
**a)** heimflutning orsakað av varandi ella verandi sjúkum, sum innan fyri seinastu tveir mánaðirnar undan fráferð, hava havt við sær:
1. sjúkrahúslegu,
2. meting/viðgerð hjá lækna, ið ikki er liður í eftirliti,
3. broyting av heilivági,

**b)** heimflutning í sambandi við varandi ella verandi sjúku, um tú:
1. ikki er farin til lækna ella hevur sýtt fyri viðgerð av sjúkuni, hóast tú átti at vitað ella havt illgruna um, at sjúkan kravdi viðgerð ella var munandi versnað,
2. um tú ert uppgivin ella sýtt er fyri viðgerð,
3. er skrivaður upp til, ávístur til ella er á bíðilista til meting/viðgerð,
4. ikki er møttur til avtalað eftirlit seinastu 2 mánaðirnar, ella orsakað av at tú ikki hevur møtt áður ella ert steðgaður við vanligum viðtalum,

**c)** heimflutning, tú sjálvur hevur fyriskipað, sum ikki hevði verið álagdar okkum, um vit høvdu skipað fyri heimflutninginum,
**d)** sjúkraflutningsflogfar í tí føri, har flutningurin kann fara fram á annan læknaliga ráðiligan hátt eftir meting frá okkara lækna,
**e)** flutningi, sum er fylgja av at tú óttast smittuvanda.

## 6. Boðsending/fylgi við sjúklingi

6.1 **Boðsending**

6.1.1 Tryggingin veitir endurgjald um so er, at tú:

**a)** *brádliga* gerst *sjúkur* ellaført skaða, ið er fevndur av grein **4. Sjúka**, har bæði viðgerandi *læknin* og okkara *lækni* meta, at hetta førir við sær sjúkrahúslegu í minst 2 samdøgur, eftir at boðsendi er komin til viðgerðarstaðið,

**b)** verður fyri bráðkomnari, lívshættisligari sjúku/ skaða, ið er fevnd av grein **4. Sjúka**.

6.1.2 Tryggingin rindar útreiðslur hjá boðsenda í sambandi við:

**a)** flutning frá bústaði í Føroyum og aftur, á bíligasta flokki,

**b)** flutning, um tú verður fluttur til annað viðgerðarstað ella heim, fyri sama prís sum tú, sí tó grein **6.3.a)**,

**c)** keyp av ferðatrygging, av sama slagi sum tín, fyri tíðarskeiðið boðsendi skal ferðast. Hetta er tó treytað av, at boðsendi lýkur øll krøv at keypa ferðatrygging,

**d)** vistarhald á sjúkrahúsi ella hotelli við í mesta lagi kr. 1.500 um dagin fyri hvønn,

**e)** skjalprógvaðar útreiðslur til mat og flutning á staðnum, í mesta lagi kr. 500 um dagin fyri hvønn.

6.1.3 **Ferðatryggingin fevnir ikki um**

**a)** boðsending, um tú verður fluttur heim innan 2 samdøgur eftir, at boðsendi skuldi verið komin til viðgerðarstaðið.

**b)** útreiðslur til boðsending, fyriskipað av tær ella boðsenda, sum Trygd ikki hevði havt, um Trygd hevði skipað fyri boðsendingini.

6.2 **Fylgi við sjúklingi**

6.2.1 Tryggingin veitir endurgjald, um tú

**a)** *brádliga* verður *sjúkur* ellaført skaða, ið er fevndur av grein **4. Sjúka**, og viðgerandi *lækni* og okkara *lækni* meta, at hetta førir við sær sjúkrahúslegu í minst 2 samdøgur,

**b)** verður fyri bráðkomnari, lívshættisligari sjúku ella skaða, ið er fevnd av grein **4. Sjúka**,

**c)** orsakað av sjúku, skaða ella deyða skal flytast heim.

6.2.2 Tryggingin rindar útreiðslur hjá *fylgdarfólk*i í sambandi við:

**a)** *neyðugar eykaútreiðslur* til flutning, í mesta lagi á somu *ferðaleið*/prísi sum tú, í teimum førum, har tú skalt flytast til hóskandi viðgerðarstað ella flytast heim, sí tó grein **6.3.a)**,

**b)** flutning til bústað ella hagar, har aftur fæst fatur á fastløgdu ferðaætlanini, á bíligasta flokki, tá ið fylgi við sjúklingi endar við útskriving av sjúkrahúsi á uppihaldsstaðnum. Tá talan er um heimflutning, endar fylgi við sjúklingi, tá komið er til bústað/sjúkrahús í Føroyum,

**c)** leingjan av verandi ferðatrygging hjá Trygd ella keyp av ferðatrygging, av sama slagi sum tí hjá skadda, fyri tíðarskeiðið sjúklingafylgi varir, treytað av, at boðsendi lýkur krøvini fyri at keypa ferðatrygging,

**d)** vistarhald á sjúkrahúsi ella hotelli við í mesta lagi kr. 1.500 um dagin fyri hvønn,

**e)** skjalprógvaðar útreiðslur til mat og flutning á staðnum, í mesta lagi kr. 500 um dagin fyri hvønn.

6.3 **Avmarkingar**

**a)** Um tú verður fluttur heim á dýrari *ferðaleið* enn tí vanligu, rindar ferðatryggingin í mesta lagi fyri ein einstakan boðsendan/*fylgdarfólk* á hesi *ferðaleið*. Um tú verður fluttur heim við fylgi av lækna ella sjúkrarøktarfrøðingi ella sjúkraflutningsflogfari,

kann boðsendi/*fylgdarfólk*ið ikki krevja flutning á somu farleið sum tú,

**b)** fulnaður fyri útreiðslur fyri *uppihald* og mat hjá *fylgdarfólk*i endar, tá ið sjúklingurin verður útskrivaður av sjúkrahúsi á uppihaldsstaðnum, ella tá komið er til bústað/sjúkrahús í Føroyum,

## 7. Ferðaslit

7.1 Tryggingin fevnir um rímiligar og *neyðugar eykaútreiðslur* fyri flutning á bíligasta flokki fyri teg og eitt *fylgdarfólk*, um tú:

**a)** verður heimkallaður til Føroya, tí ein av tínum næstringum orsakað av *brádligari sjúku* ella skaða verður innlagdur á sjúkrahús ella doyr.
Næstringar í hesum týdningi eru:
Hjúnafelagi ella *sambúgvi*, børn, *fosturbørn*, abba-/ommubørn, foreldur, *fosturforeldur*, omma, abbi, verforeldur, systkin, verdóttir og versonur, svágur og svigarinna,

**b)** ført boð um stóran skaða, sum er fylgja av bruna, vatnflóð ella innbroti í bústaði ella tíni fyritøku í Føroyum,

**c)** ført boð um at arbeiðið í tíni fyritøku verður niðurlagt orsakað av sáttmálatrætum, ella í sambandi við svikagerðir í fyritøkuni, og hendingin krevur, at tú kemur á staðið beinanvegin.

7.2 Verður ferðast í bili, kann annað flutningsfar enn bilur verða nýtt til heimflutningin, um hetta er avtalað við **SOS-International**. Í slíkum føri rindar tryggingin eisini *eykaútreiðslur* til heimflutning av bilinum, húsvogninum ella viðfestisvogninum, tó treytað av, at ongin av hinum, sum luttaka í ferðini, eru før fyri at koyra bilin heim. Endurgjaldið í hesum føri er tó í mesta lagi kr. 30.000.

7.3 **Avmarkingar**

**a)** Endurgjald er treytað av, at *heimferðin* er avtalað við okkum.

**b)** Í hvørjum *tryggingartíðarskeiði*, gevur ferðatryggingin bert rætt til eina ferð heim til viðkomandi, sum er orsøk til boðsendingina.

7.4 Um so er, at ferðin verður uppafturtikin, verða goldnar rímiligar eyka ferðaútreiðslur fyri tryggjaða og *fylgdarfólk*ið aftur hagar, ferðin varð slitin ella hagar, hesi, sambært fastløgdu ferðaætlan síni, skuldu verið komin. Endurgjaldið fyri tryggjaða er treytað av, at ferðaslitið er í fyrru helvt av ferðini.

7.4.1 Um so er, at Trygd veitir endurgjald fyri uppafturtøku av ferðini, kann endurgjald ikki eisini verða latið fyri mistar ferðadagar sambært grein **12.**

7.5 **Ferðatryggingin fevnir ikki um**

**a)** endurgjald, um ferðaslitið er minni enn 12 tímar áðrenn ætlaða heimkomu,

**b)** endurgjald, um tann av næstringunum, sum er orsøkin til ferðaslitið, er við á somu ferð, og er fluttur heim sambært grein **5.**

7.6 Fer onkur av næstringunum á sjúkrahús ella doyr, skal tryggjaði, sum prógv fyri ferðaslitinum, útvega váttan frá viðkomandi lækna.

7.7 Er brotið inn, ella er annar brotsligur tilburður hendur, skal tryggjaði, sum váttan fyri ferðaslitinum, lata Trygd løgreglufrágreiðing.

## 8. Álop

8.1 Verður tryggjaði álopin á ferðini av fólki, og fær persónskaða, sum kann ávísast, verður endurgjald veitt í samsvari við tær reglur, sum ein skaðavaldari vildi verið dømdur at gjalda í samsvari við føroyska rættarsiðvenju fyri álop, sum hevði hent undir líknandi umstøðum í Føroyum.

8.2 **Tryggingin fevnir ikki um:**

1. skaða, sum ferðafelagi elvir tryggjaða. Við ferðafelaga skilst ein, sum hevur keypt ferðina við tí endamáli at ferðast saman við tryggjaða. Vanliga er hesin nevndur á sama ferðaseðli/ferðaskjali sum tryggjaði,
2. skaða, sum stendst av, at tryggjaði hevur verið drukkin, og rúsanin er høvuðsatvoldin til skaðan,
3. skaða orsakaður av, at tryggjaði uttan rímiliga orsøk hevur komið sær í vanda fyri álopi,
4. álop, sum er hent í sambandi við at tryggjaði hevur framt eina revsiverda gerð,
5. skaða á lutir í sambandi við álop.

8.3 Treytin fyri endurgjaldi er, at tryggjaði er á lívi, tá endurgjaldið verður latið, og at tryggjaði, beinanvegin hann er álopin, boðar løgregluni á staðnum frá álopinum. Kvittan fyri fráboðanini skal latast Trygd.

## 9. Vanlukka

9.1 Tryggingin gevur rætt til endurgjald fyri *vanlukkutilburð*, sum er at skilja sum ein brádlig hending, ið elvir til likamsskaða.

9.1.1 Harumframt fevnir tryggingin um drukning, likamligan skaða elvdan av frosti, hitaslagi ella sólstingi.

9.1.2 Ferðatryggingin veitir endurgjald fyri varandi mein, ið er beinleiðis avleiðing av *vanlukkutilburði* á ferðini, um talan er um varandi meinstig á í minsta lagi 5%, ella um tryggjaði doyr á ferðini.

9.1.3 Endurgjald verður bert veitt fyri viðgerð, ið ikki kann fremjast av almenna sjúkrahúsverkinum, ella fyri útreiðslur sum ikki kunnu krevjast endurrindaðar frá Heilsutrygd ella aðrari sjúkratrygging.

9.2 **Avlamni**

9.2.1 Harafturat rindar tryggingin endurgjald í sambandi við avlamni, sum er beinleiðis fylgja av tropusjúku íkomin á ferðini. Treytin fyri endurgjaldi er, at tryggjaði hevur hildið seg til tilmælið frá WHO og/ella danska Statens Seruminstitut, viðvíkjandi koppseting og profylakse, herundir medisinsk malaria profylakse, tá ferðast verður í viðkomandi øki.

9.2.2 Avlamnisendurgjaldið er sama prosental av tryggingarupphæddini fyri avlamni, sum avlamnisprosentið verður ásett til.

9.2.3 Meinstigið verður ásett sambært meintalvuni hjá Arbejdsskadestyrelsen, sí www.ask.dk. Avlamnisstigið verður ásett eftir læknafrøðiligari metan, uttan mun til serstaka yrki hjá tryggjaða.

9.2.4 Avlamnisstigið verður ásett, so skjótt sum fylgjurnar av *vanlukkutilburðinum* kunnu metast, tó í seinasta lagi 3 ár eftir *vanlukkutilburðin.*

9.2.5 Fulnaðurin fyri avlamni er treytaður av, at tú ert á lívi, tá ið endurgjaldið verður útgoldið.

9.2.6 Tú hevur heimild til at krevja meinstigið endaliga ásett av Arbejdsskadestyrelsen. Kostnaðurin verður býttur javnt millum partarnar.

9.2.7 **Avmarkingar**
Meinstigið fyri miss av fleiri likamspørtum kann samanlagt ikki koma upp um 100%.

9.2.8 Mein, sum tú hevði undan tryggingarhendingini, kann ikki føra til, at endurgjaldið verður hægri, enn um meinið ikki var til staðar.

9.2.9 Um avlamisendurgjald er goldið, tí tryggjaði hevur verið fyri *vanlukkutilburði* og seinni doyr av hesum tilburði, verður endurgjaldið, hann hevur fingið útgoldið fyri avlami, mótroknað deyðsendurgjaldinum.

9.2.10 **Ferðatryggingin fevnir ikki um**

1. fylgjur av avlamni, ið vóru tilstaðar áðrenn vanlukkutilburðin. Eitt verandi avlamni kann tí ikki hava við sær, at avlamnisprosentið verður sett hægri, enn um eitt tílíkt avlamni ikki var tilstaðar áðrenn vanlukkutilburðin,
2. skaða elvdur av smittu, t.d. frá bakterium og virusi, sí tó grein **9.2.1**,
3. fylgjur, ið sýna seg seinni, eftir polio, t.e. post polio syndrom,
4. støður, sum sambært læknaligum (medisinskum) royndum, ikki vera hildnar elvdar av vanlukkutilburði, men sum eru íkomnar av sjúku ella sjúkubroytingum. Sama er galdandi, hóast støðan verður staðfest eftir ein vanlukkutilburð,
5. fylgjur av læknaligari viðgerð, sum ikki hevur samband við vanlukkutilburð, sum er umfataður av tryggingini,
6. skaðar á tenn og tannprotesur komnir av at tyggja,
7. vanlukkutilburðir, sum skaddi sjálvur hevur verið atvoldin til, t.d. sjálvmorð. Hetta er galdandi uttan mun til møguliga sinnisjúkustøðu ella til sinnisstøðuna annars hjá tí skadda.
    a. møguligt deyðsendurgjald verður tó goldið, um hjúnarfelagi ella ómyndug børn sita eftir, og um tryggingin hevur verið í gildi í minsta lagi 1 ár.
8. vanlukkutilburðir, elvdir av grovum ósketni ella sjálvgjørdum rúsi, íroknað ávirkan av narkotika, heilivági ella øðrum líknandi eiturevnum,
9. skaða, sum er íkomin av ókendari skaðaorsøk,
10. versnan av fylgjunum av vanlukku, sum er orsakað av verandi sjúku,

11. vanlukkutilburðir, sum henda undir luttøku ella venjing í:
a. Vandamiklum ítrótti so sum nevaleiki, karatu og líknandi kampítrótti, fjallaklintran, fallskjólslopi og líknandi, eins og kaving við súrevnisfløsku,
b. Motorkappkoyring av øllum slagi á breyt ella øðrum avbyrgdum øki.

9.2.10.1 Tó fevnir tryggingin um gokartkoyring, gyrðislop (bungeejumping) og fallskíggjalop, um talan er um eitt einstakt tiltak – t.d. í sambandi við føðingardagar, brúdleypsaftansgildi (polterabend) og líknandi. Við einstakt tiltak er at skilja, at tryggjaði ikki hevur nevndu virkisøki sum (hvørki) ítriv ella yrki.

9.3 **Andlát**

9.3.1 Ferðatryggingin rindar tryggingarupphæddina, um tú doyrt á ferðini, beinleiðis orsakað av *vanlukkutilburði*.

9.3.2 Um tú ert undir 18 ár, tá *skaðin* hendir, er tryggingarupphæddin í sambandi við deyða avmarkað til kr. 25.000.

9.3.3 Um ikki annað er skrivliga avtalað við Trygd, verður endurgjald við deyða veitt til antin hjúnarfelaga, børn, sambúgva ella arvingar hjá tryggjaða, í nevndu raðfylgju.

9.3.4 **Ferðatryggingin fevnir ikki um**
**a)** andlát orsakað av sjúku,
**b)** andlát orsakað av sjúku ella útloysing av sjúkuílegu, hóast sjúkan er íkomin ella versnað av *vanlukkutilburði*.
**c)** andláti orsakað av versnan av fylgjunum av *vanlukku*, sum er orsakað av verandi sjúku
**d)** andláti, sum er íkomin av ókendari skaðaorsøk.

9.4 **Tannskaði**

9.4.1 Tryggingin fevnir um tannskaðar, sum eru beinleiðis fylgja av *vanlukkutilburði*, í tann mun viðgerðin ikki verður endurgoldin av øðrum. Fulnaðurin fyri tannskaða er treytaður av, at viðgerðin er góðkend av Trygd, og byrjað skjótast tilber eftir *vanlukkutilburðin*.

9.4.2 **Ferðatryggingin veitir ikki endurgjald fyri**
**a)** Tyggiskaðar, uttan mun til orsøkina til skaðan,
**b)** Útreiðslur til tannviðgerð, ið er gjørd seinni enn 3 ár eftir *vanlukkutilburðin,*
**c)** Skaða á tannprotesur, ið kunnu takast úr,
**d)** Skaða orsakaður av, at tú uttan rímiliga orsøk hevur komið tær í vanda fyri álopi,
**e)** Álop, sum er hent, í sambandi við at tú hevur framt eina revsiverda gerð,
**f)** Útreiðslur í sambandi við tannskaðar, sum eru íkomnir ella versnaðir, tí tennirnar hjá tryggjaða, sambært meting av tannlækna, hava verið í munandi verri standi enn hjá fólki um sama aldur, sum ganga til regluligt tannlæknaeftirlit og fáa ta viðgerð, sum mælt er til.

9.5 **Vanlig undantøk viðvíkjandi vanlukkufulnaðinum**
Fyri *vanlukkur* í sambandi við flogferðslu, verður endurgjald bert veitt fyri *vanlukkur*, ið raka teg sum ferðafólk í tjóðarskrásettum flogførum.

9.5.1 Hóast tryggjaði hevur fleiri vanlukkutryggingar, so er alt endurgjaldið, um tílík *vanlukka* skuldi borist á, avmarkað at verða kr. 10 mió., um tryggjaði verður avlamin, og kr. 5 mió., um tryggjaði doyr. Henda upphædd verður býtt lutfalsliga millum tryggingarnar.

## 10. Privatábyrgd

10.1 Sí nærri greining av trygging fyri privatábyrgd í galdandi innbústrygging hjá Trygd.

10.2 Tryggingarupphæddirnar í endurgjaldsyvirlitinum eru hægsta mark fyri endurgjaldsskylduni hjá Trygd eftir eina einstaka tryggingarhending, hóast ábyrgdin verður áløgd fleiri persónum, ið eru fevndir av einari ella fleiri tryggingum hjá okkum.

10.3 Sum ískoyti til privatu ábyrgdartryggingina fevnir Ársferðatryggingin um endurgjaldsábyrgd sambært galdandi lóg, í tí landinum har *skaðin* hendi, fyri skaða á leigaða frítíðaríbúð/hotell og innbúgv í frítíðaríbúðini/hotellinum, við eini sjálvábyrgd á kr. 500 fyri hvønn skaða. Hetta er treytað av, at skaddu lutirnir vóru í tíni varðveitslu.

10.4 Ferðatryggingin fevnir um
**a)** ta upphædd, sum myndugleikarnir í landinum, tú er staddur í, hava álagt tær at rinda,
**b)** útreiðslur í sambandi við avgerð um endurgjaldsspurningin, í tann mun hesin frammanundan er góðkendur av okkum.

10.5 **Avmarkingar**
Tú mást ongantíð sjálvur viðurkenna endurgjalds-skyldu ella góðkenna eitt endurgjaldskrav. Støða til hetta skal altíð verða tikin av Trygd. Annars er vandi fyri, at tú sjálvur mást rinda endurgjaldið, eisini fyri skaðahendingar, sum tú ikki kanst ábyrgjast fyri. Trygd skal skjótast tilber verða kunnað um skaðahendingina, og síðani verður avgerð tikin um framhaldandi viðgerð í málinum.

10.6 **Ferðatryggingin fevnir ikki um endurgjaldsábyrgd**
**a)** íkomin í arbeiðs- ella vinnuhøpi,
**b)** fyri skaða á ella miss av egnum lutum,
**c)** fyri skaða sum er fylgja av, at tú við avtalu ella á annan hátt hevur átikið tær eina størri ábyrgd enn hana, ið er galdandi sambært vanligu reglunum um endurgjaldsábyrgd uttan fyri sáttmála.
**d)** fyri skaða á lutir, tú hevur til láns, leigu, í varðveitslu, til nýtslu, skal flyta, tilevna ella á annan hátt hevur í varðveitslu, burtursæð frá teimum í grein **10.3** nevndu førum.
**e)** fyri skaða, har tú við smittu ella á annan hátt ber øðrum sjúku,
**f)** fyri skaða, elvdur í sambandi við nýtslu av motorakfari, hús- ella viðfestisvogni, luft- ella sjófari við motori upp á meira enn 10 HK ella einum hvørjum sjófari, ið er longri enn 5 metrar,
**g)** fyri skaða, ið hendir á skyldfólk ella ferðafylgisneyta,
**h)** fyri skaða, sum djór vóru atvoldin til,
**i)** fyri skaða hendir við nýtslu av skotvápni.

## 11. Rættarhjálp og akfarsrættarhjálp

11.1 Sum ískoyti til privatu rættarhjálpartryggingina og møguliga akfarsrættarhjálpstrygging fevnir ferðatryggingin um rímiligar og *neyðugar*

**a)** *útreiðslur* til advokathjálp, tá ið *træta*, sum er íkomin á ferðini ella á ferðamálinum, krevur løgfrøðiliga hjálp,

**b)** útreiðslur til advokathjálp í sambandi við eitt revsimál, sum er íkomið í sambandi við ferðina. Um tú verður dømdur fyri eina revsiverda gerð í 1. instansi, verða longu goldnar útreiðslur roknaðar sum lán, sum skal rindast okkum aftur sambært kravi. Lánið verður rentað við diskontorentu tjóðbankans umframt 4%.

**c)** ferðaútreiðslur í sambandi við at tú er innkallaður sum vitni ella til avhoyringar í rættinum uttanlands, og tað ikki er gjørligt at hava vitnisavhoyringarnar í Føroyum.

**d)** ferðaútreiðslur í sambandi við rættar- ella gerðarættarsak, um tryggjaði skal verða hjástaddur fyri at málið kann verða framt,

**e)** útreiðslur í sambandi við trygdarveðhald, ið er neyðugt fyri at fáa teg ella ognir tínar loystar úr afturhaldið av útlendskum myndugleikum. Trygdarveðhaldið verður roknað sum rentufrítt lán, ið skal rindast Trygd aftur, tá veðhaldið er loyst ella eftir kravi.

11.2 **Fulnaðurin er treytaður av**

**a)** at hendingin, sum *trætan* ella revsimálið snýr seg um, er farin fram i tryggingartíðarskeiðinum, og viðvíkir viðurskiftum, ið eru íkomin á ferðini,

**b)** at tú sjálvur ert beinleiðis blandaður upp í trætuna ella revsimálið,

**c)** at *trætan* ikki kann viðgerast fyrisitingarliga ella kærast til kærunevnd e.l.

11.3 **Sjálvsábyrgd**

Sjálvsábyrgdin fyri skaðar undir grein **11.1 a), c)** og **d)** er 10% av samlaða endurgjaldinum, tó í minsta lagi 500 kr. Fyri grein **11.1 b)** (revsimál) er sjálvsábyrgdin 20% av samlaða endurgjaldinum, tó í minsta lagi 5000 kr. Eingin sjálvsábyrgd er galdandi fyri trygdarveðhald.

11.4 **Ferðatryggingin fevnir ikki um**

**a)** útreiðslur, sum ikki eru rindaðar við rímiligari orsøk, t.d. tí tú ikki verður mettur at hava rímiliga grund til at føra málið, ella tí at útreiðslurnar ikki standa í rímiligt mát til trætuna,

**b)** trætur millum teg og ferðamannastovuna, ferðafelagið, ferðaleiðaran ella ferðamillumgongumannin, flogfelagið ella ein ella fleiri av tínum fylgisneytum,

**c)** trætur millum teg og Trygd,

**d)** trætur í sambandi við sáttmála-, vinnu- ella starvsviðurskifti,

**e)** trætur í sambandi við familju-, sosial-, pensjóns- ella arvarættarlig viðurskifti,

**f)** um orsøkin til málið stendst av sjálvvoldum rúsi, og rúsanin er høvuðsatvoldin,

**g)** útreiðslur í sambandi við ferðslumál, har tú nýtti motorrikið flutningstól,

**h)** endurgjøld, bøtur ella krøv, ið líkjast bót.

## 12. Endurgjald í sambandi við frítíðarferð

12.1 Tryggingin veitir endurgjald í teimum førum ferðin og uppihaldið hjá tryggjaða fer fyri skeyti av:

1. sjúkrahúslegu, (grein 4)
2. heimflutningi, (grein 5)
3. ferðasliti, (grein 7)
4. deyða,
5. brádligari sjúku/skaða, sum hevur við sær at tú ikki ført útint høvuðsmálið við ferðini. Sjúkan/*skaðin* skal skjalprógvast av lækna á staðnum. Skjalprógvið er grundarlag fyri metingini hjá Trygd av, um høvuðsmálið við ferðini ikki kann verða framt.

12.2 **Endurgjald fyri mistar dagar**

Ferðatryggingin veitir endurgjald fyri teir dagar, sum ikki kunnu gagnnýtast á ferðini, orsakað av eini ella fleiri skaðahendingum nevndar omanfyri. Endurgjaldið verður grundað á *ferðakostnaðin* pr. dag. Endurgjald verður í fyrsta lagi veitt frá tí degi, tú verður innlagdur á sjúkrahús, boðsendur heim, fluttur heim, ella fer til lækna.

12.3 Hesi eru fevnd av fulnaðinum:

**a)** **Foreldur, ið ferðast saman við egnum børnum ella *fosturbørnum*, ið búgva heima ella eru yngri enn 21 ár:** Um ein ella fleiri av hesum hava rætt til endurgjald, veitir ferðatryggingin endurgjald fyri alt húskið.

**b)** **2 fólk ferðast saman (tryggjaði og *ferðafelagi*):** Um annað hevur rætt til endurgjald, veitir ferðatryggingin endurgjald fyri bæði.

**c)** **Fleiri enn 2 fólk ferðast saman:** Ferðatryggingin fevnir bert um *ferðakostnaðin* pr. dag hjá skadda. Er skaddi undir 16 ár, veitir ferðatryggingin eisini endurgjald fyri 50% av tí, ferðin kostar pr. dag fyri eitt *fylgdarfólk*.

**d)** Tryggjaði ferðast einsamallur: Ferðatryggingin fevnir um *ferðakostnaðin* pr. dag hjá skadda.

12.4 **Avmarkingar**

Fulnaður er ikki fyri frítíðarendurgjaldi uttan fyri tryggingartíðarskeiðið.

12.5 **Serligar treytir**

**a)** Um tú ikki ført veitt Trygd skjalprógv frá viðgerandi lækna, sum váttar, at tú ikki hevur verið førur fyri at útinna tað, sum var høvuðsmálið við ferðini, verður avgerð um møguligt endurgjald grundað á meting frá okkara lækna.

**b)** Fyri teir í **12.3 a), b)** og **c)** nevndu persónar, verður endurgjald veitt fyri sama tíðarskeið sum hjá skadda.

## 13. Seinkað viðføri

13.1 Sum ískoyti til innbústryggingina fevnir ferðatryggingin um:

1. Virkna skaðahjálp, sí grein **13.4**, við upp til 10% av tryggingarhæddini fyri innbúgv, tó í mesta kagi kr. 15.000 fyri hvørt tryggingarskjal. Virkin skaðahjálp verður mótroknað í endurgjaldinum fyri viðføri í innbústryggingini.

2. Endurgjaldskeyp í førum, tá innskrivað viðføri kemur meira enn 5 tímar seinni enn tú til ferðamálið uttanlands. Endurgjaldið er kr. 1.200 pr. dag, tó í mesta lagi kr. 4.800. Endurgjaldið kann tó ongantíð verða hægri enn kr. 9.600 fyri øll ferðandi pr. hending/seinking. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at váttan um seinkanina frá flutningsfelagnum verður latin Trygd.
3. Rímiligar og neyðugar eykaútreiðslur til leigu av samsvarandi útgerð (so sum barnavogni, -stóli, skí- ella golfútgerð), um tín egna er seinkað meira enn 5 tímar eftir, at tú ert komin til ferðamálið uttanlands. Endurgjaldið kann í mesta lagi verða kr. 3.000 pr. persón og kr. 6.000 fyri øll ferðandi pr. hending/seinking. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at váttan um seinkanina frá flutningsfelagnum verður latin Trygd.

13.2 Tryggingin veitir ikki endurgjald, tá viðførið er seinkað, og tryggjaði er komin heimaftur til Føroya.

13.3 Viðvíkjandi skaða ella stuldri av viðføri verður víst til galdandi treytir fyri innbústryggingina hjá Trygd.

13.4 **Trygd Emergency Centre** skipar fyri skaðatænastu á staðnum, Hetta merkir, at *skaði*, sum endurgjald verður veitt fyri sambært hesi ferðatrygging ella innbústryggingini hjá Trygd, heilt ella partvíst kann verða avgreiddur á ferðini.

13.4.1 Endurgjaldið kann verða avmarkað og treytað av bráðfeingis fíggjarliga tørvinum, og endalig skaðaviðgerð kann tískil verða gjørd, tá tú er komin heimaftur av ferðini.

## 14. Ferðaskjøl

14.1 Ferðatryggingin veitir endurgjald fyri stuldur av og skaða á ferðaseðlar, pass, visum, dankort, visa/dankort, koyrikort og gjaldskort.

14.2 Ferðatryggingin veitir endurgjald fyri *eykaútreiðslur* til
- **a)** endurútvegan av ferðaseðlum, passi, visum, dankorti, visa/dankorti, koyrikorti og gjaldskortum,
- **b)** neyðugan flutning, avgjøld og myndir.

14.3 **Ferðatryggingin veitir ikki endurgjald fyri**
- **a)** gloymdar, mistar og mislagdar lutir,
- **b)** stuldur av ferðaskjølum, ið eru løgd eftir ella ikki eru undir fullgóðum uppsýni,
- **c)** miss í sambandi við misnýtslu av gjaldskorti,
- **d)** tíðarmiss at endurútvega lutirnar.

## 15. Ov seint framkomin á ferðini uttanlands

15.1 Ferðatryggingin veitir endurgjald fyri hóskandi, *neyðugar* og skjalprógvaðar *eykaútreiðslur* til at koma upp í aftur skipaða *ferðaleið*, orsakað av at tú:
- **a)** ikki av egnum ávum og óvæntaðum orsøkum er ov seinur til alment flutningsfar, ella flutningsfar, sum tann, ið skipar fyri ferðini, hevur fingið til vega, ella
- **b)** verður fyri hending, sum er fevnd av grein 14 (ferðaskjøl), og tú noyðist at endurútvega flogferðaseðil, pass ella visum.

15.2 Tryggingin fevnir um endurgjald fyri *eykaútreiðslur* til:
- **a)** flutning at koma upp í aftur skipaða ferðalagið, á sama kostnaðarstøði sum tað upprunaliga,
- **b)** *uppihald* á hotelli, í mesta lagi kr. 1.500 um dagin,
- **c)** mat og flutning á staðnum, í mesta lagi kr. 500 um dagin.

15.3 **Serligar treytir**
- **a)** Fulnaðurin er treytaður av, at ferðaseðilin/ferðaseðlarnir eru bílagdir og rindaðir 18 tímar undan fráferð.
- **b)** Váttan frá flutningsfelagnum og onnur týðandi skjøl, sum vísa eykaútreiðslurnar, og hví seinkanin var, skulu latast Trygd.
- **c)** Tíðarskeiðið annars fyri steðgir uttanlanda skulu í minsta lagi svara til **Minimum Connecting Time** hjá viðkomandi floghavn.

15.4 **Ferðatryggingin fevnir ikki um**
- **a)** Seinkaða framkomu á útferðini upp til 24 tímar eftir fráferðina, um ferðatryggingin ikki er keypt fyrr enn sjálvan fráferðardagin.

## 16. Ferðin úr Føroyum ella til Føroya seinkað

16.1 Tryggingin fevnir um óváttaðar *eykaútreiðslur* fyri hvørt byrjað samdøgur, um tryggjaði, eftir galdandi ferðaætlan, verður seinkaður meira enn 8 tímar á veg úr Føroyum ella til Føroya.

16.2 Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at váttan um seinkanina frá flutningsfelagnum verður latin Trygd.

16.3 Endurgjaldið er kr. 1.000 fyri hvørt byrjað samdøgur, tó í mesta lagi kr. 4.000.

## 17. Frítíðaríbúðartrygging

17.1 Ferðatryggingin veitir endurgjald, um ikki er verandi í frítíðarbústaðnum uttanlands, orsakað av skaða, spreinging, vatnflóð, jarðskjálvta ella aðrari náttúruvanlukku.

17.2 Endurgjaldið umfatar útreiðslur til at leiga samsvarandi frítíðarbústað.

## 18. Persónlig trygd

18.1 **Kreppuhjálp á staðnum**

18.1.1 Ferðatryggingin rindar tínar útreiðslur til kreppuhjálp á vanlukkustaðnum, um tú hevur verið fyri:

1. Ráni
2. Álopi
3. *Vanlukku*, íroknað ferðsluvanlukku
4. Ógvusligari, skelkandi hending, har fleiri fólk vóru blandað uppí
5. Eldi, spreinging ella innbroti
6. Álvarsligari sjúku ella deyða
7. Náttúruvanlukku
8. Yvirgangi, kríggi ella krígslíknandi støðu
9. Gíslatøku

18.1.2 Fulnaðurin er treytaður av, at okkara *lækni* ella sálarfrøðingur metir, at kreppuhjálp er neyðug.

18.2 **Kreppuhjálp til avvarðandi umvegis telefon**

18.2.1 Hevur tú rætt til kreppuhjálp sambært grein **18.1 Kreppuhjálp á staðnum**, fevnir ferðatryggingin um útreiðslur til kreppuhjálp til tíni avvarðandi umvegis telefon.

18.2.2 Við avvarðandi er at skilja: Foreldur, hjúnarfelagi/*sambúgvi*, børn og systkin.

18.2.3 Fulnaðurin er treytaður av, at okkara *lækni* ella sálarfrøðingur metir, at kreppuhjálp til tíni avvarðandi er neyðug.

18.2.4 Endurgjald verður bert veitt fyri útreiðslur, ið ikki kunnu verða endurrindaðar aðrastaðni, t.d. frá Heilsutrygd, sjúkratrygging, aðrari trygging ella verða endurgoldnar av almenna sjúkrahúsverkinum.

18.3 **Kreppuhjálp eftir heimkomu**

18.3.1 Ferðatryggingin fevnir um tínar útreiðslur til sálarliga kreppuhjálp eftir heimkomu, um tú hevur verið fyri

1. Ráni
2. Álopi
3. *Vanlukku*, íroknað ferðsluvanlukku
4. Ógvusligari, skelkandi hending, har fleiri fólk vóru blandað uppí
5. Eldi, spreinging ella innbroti
6. Álvarsligari sjúku ella deyða
7. Náttúruvanlukku
8. Yvirgangi, kríggi ella krígslíknandi støðu
9. Gíslatøku

18.3.2 Fulnaðurin er treytaður av, at tín *lækni* vísir tær til sálarfrøðiliga viðgerð.

18.3.3 Endurgjald verður bert veitt fyri útreiðslur, ið ikki kunnu verða endurrindaðar aðrastaðni, t.d. frá Heilsutrygd, sjúkratrygging, aðrari trygging ella verða endurgoldnar av almenna sjúkrahúsverkinum.

## 19. Evakuering

19.1 Ferðatryggingin fevnir um rímiligar og neyðugar útreiðslur til flutning, hoteluppihald, mat, klæði og lokalan flutning í sambandi við evakuering til næsta trygga stað ella til Føroyar.

Fulnaður er fyri endurgjaldi, um:

**a)** Danska Uttanríkismálaráðið mælir til evakuering ella *heimferð* orsakað av kríggi ella krígslíknandi støðu, ella um hóttandi vandi er fyri kríggi ella krígslíknandi støðu í tí landinum, tú ert staddur,
**b)** Danska Uttanríkismálaráðið mælir til evakuering ella *heimferð* orsakað av yvirgangsatgerð ella hóttandi vanda fyri yvirgangsatgerð,
**c)** Danska Uttanríkismálaráðið ella myndugleikarnir á staðnum mæla til evakuering ella *heimferð* orsakað av náttúruvanlukku ella hóttandi vanda fyri náttúruvanlukku í økinum, tú ert staddur,
**d)** Danska Uttanikismálaráðið mælir til evakuering ella *heimferð* orsakað av lívshættisligari umfarssótt í økinum, tú ert staddur.

19.2 Avgerð um fulnað fyri evakuering, og hvar næsta trygga stað er, verður grundað á tilráðingar frá danska Uttanríkismálaráðnum, Statens Serum Institut og myndugleikum á staðnum.

19.3 **Avmarking**
Um tað ber til, skal evakuering verða framd beinanvegin. Tekur tú ikki av tilboðnum um evakuering beinanvegin, fellur fulnaðurin burtur.

19.4 Ferðatryggingarfulnaður er ikki um Uttanríkismálaráðið, Statens Serum Institut ella myndugleikar á staðnum hava viðmælt ella fyriskipað evakuering, áðrenn tín ferð inn í økið byrjaði.

## 20. Leiting og bjarging

20.1 Ferðatryggingin fevnir um *neyðugar* útreiðslur í sambandi við leitan og/ella bjarging. Fulnaðurin er treytaður av, at

**a)** hendingin er fráboðað løgregluni á staðnum ella lokalu myndugleikunum, og at leitanin/bjargingin er sett í verk av hesum ella Uttanríkismálaráðnum, og at
**b)** Trygd skjótast tilber verður kunnað um, um ein leiting ella bjarging verður neyðug, og góðkennir tey feløg, ið skulu skipa fyri leitingini, og í hvønn mun.

20.2 **Avmarkingar**

**a)** Uttan mun til nøgd av teknaðum tryggingum og tryggingartakarum er hámarksendurgjaldið, ið verður útgoldið í sambandi við ein skaða, avmarkað til kr. 300.000.
**b)** Fulnaðurin er treytaður av, at tann, ið leitað verður eftir, er tryggjaður í Trygd. Verður leitað eftir fleiri persónum í bólki, verða leitingarútreiðslurnar býttar eins millum talið av teimum, ið leitað verður eftir.
**c)** Tað verður ikki mett sum leitan, um tú ikki hevur kunnað tíni avvarðandi um, hvar tú ert ella ferðast, og tey vilja hava samband, uttan mun til orsøkina til ynskið um samband.
**d)** Í sambandi við allar skaðar undir grein **20 Leiting og bjarging** er sjálvsábyrgdin 10%, tó í minsta lagi kr. 2.500 fyri hvønn skaða.

20.3 **Ferðatryggingin fevnir ikki um**

**a)** samsýning til felagsskapir/myndugleikar, ið vanliga arbeiða sjálvbodnir/ókeypis í sambandi við leitan,
**b)** leitan norðan fyri 75. breiddarstig, ella á Suðurpólinum,
**c)** leitingartørv av, at tú hevur sýnt grovt ósketni,
**d)** leitan eftir tryggjaðum við verandi sálarligari sjúku, ið trúliga er orsøkin til, at viðkomandi er burturi,
**e)** leitan eftir tryggjaðum, ið hevur fingið staðfest endaliga sjúkuavgerð,
**f)** leitan eftir persónum, ið hvørva, meðan teir fremja ella venja *yrkisítrótt* ella eru á vísindarligari kanningarferð,
**g)** kostnað til leitan/bjarging í sambandi við gíslatøku ella rán.

## 21. Yvirgangur

21.1 **a)** Um tú verður beinleiðis raktur av *yvirgangi*, ið førir til persónsskaða, fevnir ferðatryggingin um *neyðugar eykaútreiðslur* til framskundaða *heimferð*/heimflutning til Føroya, eisini sjúkraflutningsflogfar, um neyðugt. Hetta er treytað av, at okkara *lækni* metir heimflutning vera neyðugan, og at flutningurin er fyriskipaður eftir avtalu við okkum.

**b)** Um tú óbeinleiðis verður raktur av yvirgangi, orsakað av yvirgangsatsókn, so sum bumbuspreinging, álopi við evna- ella lívfrøðiligum vápnum, flográni ella øðrum yvirgangi, ið elvir til persónsskaða á onnur enn teg, innan fyri ein radius á 5 km frá har ið tú ert, fevnir ferðatryggingin um *neyðugar eykaútreiðslur* til framskundaða *heimferð*. Ferðatryggingin fevnir í mesta lagi um helvtina av tí upphædd, sum tú upprunaliga hevur goldið fyri flutningin hjá tær.

21.2 **Avmarkingar**
Fulnaðurin er treytaður av, at framskundað *heimferð*/heimflutningur hevur við sær heimkomu til Føroya, áðrenn 72 tímar fyrr enn upprunaliga ætlað.

21.3 **Ferðatryggingin fevnir ikki um**
Fyriskipaðan heimflutning av ferðafyriskiparanum ella øðrum, íroknað almennum myndugleikum.

## 22. Gíslatøka

22.1 I teimum førum, har tú verður hildin gísli, fevnir ferðatryggingin um:
**a)** *neyðugar eykaútreiðslur* í sambandi við heimflutning til Føroya, eisini sjúkraflutningsflogfar, um neyðugt. Hetta er treytað av, at okkara *lækni* metir heimflutning vera neyðugan, og at flutningurin er fyriskipaður sambært avtalu við okkum,
**b)** *eykaútreiðslur* til *uppihald* á gistingarhúsi, lokalan flutning og mat,
**c)** leingjan av tryggingartíðarskeiðnum, um tryggingartíðarskeiðið rennur út, meðan tú verður hildin gísli. Leingjanin kemur í gildi, tá galdandi tryggingartíðarskeið er farið, og varir til tú ert komin aftur til Føroya, tó í mesta lagi 14 dagar eftir, at tú ert vorðin leyslatin.

22.2 **Ferðatryggingin fevnir ikki um**
**a)** útreiðslur í sambandi við rannsakan av gíslatøku,
**b)** útreiðslur til loysigjald,
**c)** skaða, sum er íkomin av hendingum, ið fara fram í økjum, har tað er kríggj, krígslíknandi umstøður, uppreistur ella borgarligur ófriður.

## 23. Tryggjaði afturhildin í sambandi við kríggj

23.1 Ferðatryggingin veitir endurgjald fyri *neyðugar eykaútreiðslur*, um tú verður afturhildin av myndugleikunum í einum landi, orsakað av kríggi ella vanda fyri kríggi.
Endurgjald verður veitt fyri:
**a)** *uppihald* og innanríkisflutning,
**b)** mat upp til kr. 500 um dagin.

23.2 **Avmarkingar**
Fulnaðurin steðgar 3 mánaðar eftir, at tú fyrstu ferð vart afturhildin.

## 24. Ítróttur

24.1 Um so er, at tú ikki ert førur fyri at fremja ætlaðu ítróttina, vegna bráðkomnari sjúku ella skaða á ferðini, sí grein **4**, veitir tryggingin endurgjald fyri goldnar skjalprógvaðar útreiðslur til ætlað tiltøk og leigaða ítróttarútgerð, sum tú ikki fært afturgoldnar. Endurgjaldið er í mesta lagi kr. 3.000.

Treytin fyri endurgjaldi er, at *læknin* á frítíðarstaðnum váttar, at ætlaða ítróttin ikki kundi íðkast vegna sjúku ella skaða.

24.2 Endurgjaldið verður veitt frá tí degi, tú fert til lækna og heldur uppat tann fyrsta av hesum døgum:
**a.** tá tú ert førur fyri at íðka ítróttina aftur,
**b.** ætlaða heimkomudagin,
**c.** tann dagin, sum tryggingin fer úr gildi.

## 25. Leigubilur undan fráferð

25.1 Ferðatryggingin veitir endurgjald til leigubil, si grein **25.3**, um tín egni bilur fær skaða í Føroyum beint undan ætlaðari bilferð. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at bilurin ikki kann umvælast áðrenn ætlaðu fráferðina úr Føroyum.

25.2 Tað er somuleiðis ein treyt fyri endurgjaldi, at skrokktrygging er teknað fyri bilin, og bilurin fær skaða, ið er umfataður av tryggingini.

25.3
**a)** Ferðatryggingin veitir endurgjald fyri útreiðslur til leigubil, sum er í samsvari við tín bil. Tó hava vit rætt til at lata tær størri bil. Leigubilurin verður leigaður uttan endurgjald fyri koyrdar kilometrar.
**b)** Ferðatryggingin veitir endurgjald fyri leigu av bili frá 2 døgum áðrenn ferðin byrjar til dagin eftir ætlaða heimkomu, ella tann dagin tryggingin fer úr gildi - tó í mesta lagi 42 dagar.
**c)** Leigubilurin verður leigaður frá bilútleigarafyritøku eftir ávísing frá okkum, sambært treytunum hjá útleigarafyritøkuni, íroknað ábyrgdar- og skrokkfulnað. Tú skalt sjálvur á útleigingarfyritøkuna eftir og við bilinum.

25.4 **Ferðatryggingin veitir ikki endurgjald fyri útreiðslur til**
**a)** leigu av motorsúkklu, hús- ella viðfestisvogni, húsbili o.l.,
**b)** brennievni, olju, sprinklaravesku o.l.,
**c)** heintan ella innlatan av leigubilinum.

## 26. Sjálvsábyrgd í sambandi við leigu av motorakfari uttanlands

26.1 Ferðatryggingin veitir endurgjald fyri útreiðslur fyri sjálvsábyrgd í sambandi við skrokkskaða á leigaðan personbil, motorsúkklu ella prutl uttanlands.

26.2 Ferðatryggingin veitir **ikki** endurgjald, um
**a)** persónbilurin, motorsúkklan ella prutlið, tú hevur leigað, ikki er skrokktryggjað,
**b)** um tú, sambært lóggávuni í viðkomandi landi, ikki hevur loyvi at koyra akfarið.

## 27. Ársavlýsingartrygging

27.1 Tryggingin fevnir um avlýsing av ferðini orsakað av, at tú ikki kanst fara á ætlaðu ferðina, tí:
a) tú sjálvur
b) hjúnarfelagi/*sambúgvi*
c) børn/*fosturbørn*
d) barnabørn
e) svigarbørn
f) foreldur/*fosturforeldur*
g) verforeldur
h) systkin og børn hjá systkjum
i) abbar og ommur
j) svigarinnur
k) svágrar
*l) ferðafelagið*
m) ferðaleiðari
verða fyri:

1. álvarsligari bráðkomnari sjúku/skaða, sum krevur sjúkrahúsinnlegging,
2. bráðkomnari sjúku/skaða, sum krevur seingjarlegu eftir læknaboðum,
3. bráðkomnari sjúku/skaða, og *lækni* metir, at ikki er ráðiligt at fara ætlaðu ferðina
4. tilburðir, ið kunnu javnmetast við omanfyri standandi
5. deyða

27.2 Harumframt fevnir tryggingin um avlýsing av ferðini orsakað av, at tú ikki kanst fara ætlaðu ferðina, tí:
**a)** Eldsbruni, spreinging ella innbrot hevur verið á tínum privata bústaði ella virki beint frammanundan fráferð. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at tað er neyðugt at tryggjaði verður verandi í Føroyum, og at løgreglufrágreiðing er skrivað.
**b)** Fíggjarsvik hevur verið á virkinum hjá tryggjaða í Føroyum beint frammanundan fráferð, og hetta er framt av fólki, sum starvast á virkinum ella av fólkið, ið hevur samband við virkið. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at tað er neyðugt at tryggjaði verður verandi í Føroyum, og at løgreglufrágreiðing er skrivað.
**c)** Arbeiðssteðgur, sum ikki er samsvarandi sáttmála, og sum kemur fyri í virkinum hjá tryggjaða beint frammundan fráferð.
**d)** Tryggjaði óvilja er uppsagdur beint frammanundan fráferð, orsakað av at virkið, har tryggjaði hevur starvast seinastu árini í minsta lagi 20 tímar um vikuna, heldur uppat ella minkar um virksemi.
**e)** Tryggjaði av læknaligum orsøkum ikki tolir koppseting, sum knappliga og óvæntað verður kravd, tá ferðast verður til tað ferðamálið, tryggjaði ætlar at fara til.
**f)** Tryggjaði ikki stendur roynd á lærdum háskúla ella líknandi á hægri lærustovni, har tryggjaði lesur fulla tíð, og hann tí skal til nýggja roynd. Tað er ein treyt, at ferðin var keypt, áðrenn miseydnaðu royndina og at nýggja royndin fer fram í ferðatíðini ella í seinasta lagi upp til 1 viku eftir ætlaða heimkomu.
**g)** Eitt alment fyriskipað tiltak uttanlands, t.d. ítróttarkapping, fótbóltsdystur, konsert ella sjónleikur verður avlýst. Tað skal kunna skjalprógvast, at tað avlýsta tiltakið er endamálið við ferðini.
**h)** Tryggjaði av heilsuligum ávum ikki fær luttikið í ætlaðum virksemi/aktiviteti á ferðini. Tað skal kunna skjalprógvast, at hetta virksemið er endamálið við ferðini. Trygd kann krevja skjalprógv og læknavàttan.
**i)** At tú er við barn og lækni metir, at tú ikki kann ferðast, tí tað eru umstøður við viðgongutíðini, sum gera, at tað ikki er ráðiligt at ferðast. Talan kann t.d. vera um, at vandi er fyri at eiga ov tíðliga. Tað er ein treyt, at tú ikki var vitandi um umstøðurnar, ið eru orsøk til avlýsingina, tá ferðin varð keypt.

27.3 **Tryggingin veitir ikki fulnað:**
**a)** Um so er at tryggjaði, tá ferðin varð bíløgd, var vitandi um sjúkuna/umstøðurnar/hendingina, sum hevði við sær avlýsingina, og visti ella átti at vita, at sjúkan/umstøðurnar/hendingin kundi ætlast at hava við sær, at ferðin fór at verða avlýst.
**b)** Tá avlýsta ferðin er partur av einum tiltaki, av tí at tryggingin einans fevnir um avlýsing fram til fráferð úr Føroyum.
**c)** Tá orsøkirnar eru aðrar enn tær nevndu, sum fevndar eru av tryggingini, t.d. iðran, broyttar ferðaætlanir o.a.
**d)** Endamálið við avlýstu ferðini var annað enn frítíðarferð.
**e)** Um so er, at avvarðandi myndugleikar ráddu frá at ferðast til økið, tá ferðaseðilin varð keyptur.

27.4 **Serstakar ásetingar**
**a)** Tað er ein treyt fyri fulnaði, at tryggingin er teknað, áðrenn ferðin er keypt, ella tá depositum er goldið.
**b)** Tryggingin er bert galdandi, til farið verður úr Føroyum.
**c)** Veðseting ella avhending av rættindum sambært hesi trygging kunnu ikki fara fram uttan samtykki frá Trygd.
**d)** Tryggingin rindar ikki fyri skaða ella útreiðslu, sum eru fevnd av aðrari trygging ella øðrum.
**e)** Tað er ein fortreyt fyri endurgjaldsskyldu felagsins í sambandi við sjúku ella deyða, at felagið fær læknavàttan ella deyðsváttan viðvíkjandi tí persóni, sum er orsøk til avlýsingina, áðrenn fráferð eigur at fara fram. Tryggjaði rindar kostnaðin fyri tílíka váttan.
**f)** Tá *skaði* hendur, skal skaðafráboðan latast inn skjótast tilber, saman við ferðaseðli til flogfar, buss v.m. Er eingin ferðaseðil tøkur, skal fíggjarligi missurin skjalprógvast við rokning frá tí, sum hevur skipað fyri ferðini.

27.5 **Hvat verður endurgoldið?**
Endurgjaldið fevnir um tann partin av *ferðakostnaðinum*, sum tú ikki kanst fáa endurgoldnan frá t.d. ferðaskrivstovu, flutningsfelag, aðrari trygging ella øðrum, um so er, at tú avlýsir ferðina, orsakað av eini hending, sum er fevnd av tryggingini.

27.6 Endurgjaldið er í mesta lagi kr. 60.000 íalt fyri hvørja einstaka ferð. Hetta er galdandi, hóast talan er um fleiri persónar, ið avlýsa ferðina.

27.7 **Viðurskifti í sambandi við skaðatilburð**
Verður ein ferð avlýst, skal hetta beinanvegin fráboðast til:

**P/F Trygd Tryggingarfelag**
Oknarvegur 5
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 81 00

trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Øll krøv mótvegis Trygd skulu skjalprógvast.

## Orðalisti/Hugtøk

Her sært tú frágreiðingar um ymsu máliskurnar, sum eru skrivaðar í *kursiv* í treytunum.

**Brádliga ákomin sjúka**
Nýliga íkomin sjúka, grundaður illgruni um nýliga íkomna álvarssama sjúku, ella óvæntað versnan av verandi ella varandi sjúku.

**Eykaútreiðslur**
Útreiðslur á ferðini, sum tú bert hevði orsakað av fulnaðarheimilaðum skaða.

**Fastløgd ferðaleið**
Ferðaleið, sum kann skjalprógvast sambært ferðafrásøgn frá ferðamannastovu, keyptum flog-, tok- ella bussferðaseðlum ella gistingum.

**Ferðafelagi**
Ein, ið hevur keypt ferðina við tí endamáli at ferðast saman við tryggjaða. Vanliga er hesin nevndur á sama ferðaseðli/ferðaskjali sum tryggjaði.

**Ferðakostnaður pr. dag (ferðatrygd):**
Frammanundan goldnar úreiðslur til flutning, uppihald umframt ferðafólkaveitingar, sum ikki kunnu krevjast afturgoldnar, býtt við longdini av ferðini (ávíkavist fráferðar- og heimkomudagur verða roknaðir sum ein dagur).

Tá ferðast verður í egnum akfari, verður ferðakostnaðurin pr. dag roknaður soleiðis:
Kr. 500 pr. dag fyri hvønn tryggjaðan, tó í mesta lagi kr. 2.000 pr. dag pr. akfar býtt við longdini av ferðini (ávíkavist fráferðar- og heimkomudagur verða roknaðir sum ein dagur).

**Ferðakostnaður – avboð:**
Eru frammanundan bílagdar ferðaveitingar, so sum ferðaseðlar og aðrar flutningsútreiðslur, íroknað uppihald, t.d. hotell ella íbúð, frá ferðafólkaveitara ella sum ein sjálvur hevur bílagt og hevur goldið áðrenn fráferð, og sum ikki kunnu fáast afturgoldnar frá veitaranum. Útreiðslur til t.d. leigubil ella keyptir ferðaseðlar til bussflutning á ferðastaðum eru somuleiðis umfataðar av tryggingini.
Tá ferðin er til eitt alment tiltak, verður møguligt atgongumerkið ikki endurgoldið, bert ferðaútreiðslurnar.

**Fosturbarn**
Barn, sum ikki er títt biologiska barn, og tú ert giftur ella býrt saman við einum av biologisku foreldrunum hjá barninum, og sum tú hevur búð saman við í minst eitt ár.
Um talan er um barn, sum ikki er títt biologiska barn, og tú ikki ert giftur ella býrt saman við einum av biologisku foreldrunum at barninum, skal barnið altíð vera skrásett á sama bústaði sum tú, og tú skalt vera góðkendur av Ríkisumboðnum sum forsyrgjari barnsins.

**Fosturforeldur**
Persónar, sum ikki eru tíni biologisku foreldur, men sum eru gift ella búgva saman við einum av tínum biologisku foreldrum, og sum tú hevur búð saman við í minst eitt ár, ella sum hava búð saman við einum av tínum biologisku foreldrum í minst tvey ár. Ella persónar, sum ikki eru tíni biologisku foreldur, men góðkend av Ríkisumboðnum sum tínir forsyrgjarar.

**Fostursystkin**
Persónar, sum ikki eru tíni biologisku systkin, men sum tú býrt ella hevur búð saman við sum systkin í minst eitt ár, áðrenn tú fylti 21 ár.

**Fylgdarfólk**
Ein ella fleiri persónar, sum hava keypt somu ferð sum tú, og sum eru fevnd av eini ferðatrygging hjá Trygd.

**Heimferð**
Ferð heim til Føroya, sum tú fánskur megnar at gera á bíligasta flokki.

**Hjálpitól**
Lutir sum kunnu avmarka og vera til hjálp í sambandi við likamligt brek.

**Lækni**
Útbúgvin og av myndugleikunum á staðnum góðkendur lækni, sum ikki sjálvur er tryggjaði, í familju við tryggjaða ella ferðast saman við tryggjaða.

**Mánaður**
Álmanakka-mánaður.

**Neyðugar útreiðslur**
Útreiðslur, sum ikki slepst undan. Tá møguleiki bæði er fyri viðgerð á staðnum og heimflutningi til framhaldandi viðgerð í Føroyum, fevnir ferðatryggingin um ta loysn, sum lønar seg best fyri Trygd.

**Okkara *lækni***: *Lækni*, sum er knýttur at TRYGD Emergency Center, ella *lækni* sum verður nýttur sum ráðgevi hjá Trygd.

**Protesur**
Protesur eru eftirgjørd lið og limir, tenn og handilstenn.

**Útreiðslur í sambandi við uppihald**
Samlaðar útreiðslur til uppihald, mat og almennan flutning e.l.

**Sambúgvi**
Persónur, tú býrt saman við sum vóru tit gift, ið er skrásettur á sama bústaði sum tú.

**Skaði**
Skaði er ein støða, har tú gert krav galdandi mótvegis Trygd.

**Tryggingartíðarskeið**
Tryggingartíðarskeiðið er tilskilað í tryggingarskjalinum. Tryggingarfulnaður kemur í gildi, tá tú fert frá húsum at byrja uttanlandsferðina og endar, tá ið tú kemur til hús aftur, ella tá tryggingartíðarskeiðið er av, um so er, at hetta endar, áðrenn tú ert heima aftur.

**Træta**
Ítøkilig ósemja, ið ber við sær rímiligt grundarlag fyri borgarligum rættarmáli.

**Umfarsótt**
Brádligt útbrot av nógvum tilburðum av somu smittandi sjúku í einum landi ella øki.

**Vanlukkutilburður**
Er ein brádlig hending, ið elvir til likamsskaða.

**Vísindaligar rannsóknarferðir**
Rannsóknarferðir til øki, har lokalu, almennu myndugleikarnir krevja serstakt loyvi at uppihalda sær, og tú fært samsýning fyri rannsóknarferðina.

**Yrkisítrótt**
Um tú í sambandi við ítrótt hevur sáttmálabundnar skyldur mótvegis einum felagi, stuðli e.l. og sum tú fært samsýning fyri.

**Yvirgangur**
Skipaður harðskapur ella hóttan um slíkan, sum við at skapa ótta millum fólk verður nýttur til at trýsta myndugleikar fyri at røkka politiskum ella átrúnaðarligum málum.

# Deild II

## "Hvat geri eg um...?" – tá tú hevur brúk fyri tíni ferðatrygging

Hetta brotið er partur av tryggingartreytunum. Tað er týdningarmikið, at tú fylgir leiðbeiningini, tá tað kann hava týdning fyri møguligt endurgjald frá **Trygd**.

**Hevur tú spurningar ella brúk fyri leiðbeining?**
Um so er, at tú, áðrenn ferðin byrjar ella á ferðini, hevur spurningar ella brúk fyri leiðbeining, ert tú altíð vælkomin at venda tær til **Trygd**. Telefonin svarar mánadag til hósdag millum klokkan 9 og 16, fríggjadag tó til klokkan 15.30 (føroyska tíð).

Tlf.: (+298) 35 81 00
Fax: (+298) 31 72 11
E-mail: trygd@trygd.fo

**Hvussu meldar tú ein skaða til?**
Tú kanst brúka Trygd Emergency Centre í Keypmannahavn, óansæð hvar í verðini tú ert. Telefonin svarar 24 tímar um døgnið, 365 dagar um árið.

Telefon (+45) 44 25 81 00
Fax (+45) 33 15 60 61

Hjá **Trygd Emergency Centre** fært tú samband við eitt starvsfólk, sum hjálpir tær. Er talan um sjúku ella vanlukkutilburð, eru læknar klárir at tosa við læknan, ið viðgerð teg. Tað er týdningarmikið at tú fylgir leiðbeiningini hjá læknanum hjá **Trygd** ella læknanum hjá **Trygd Emergency Centre**.

Áðrenn tú ringir, er tað eitt gott hugskot at hava allar týðandi upplýsingar klárar – so sum tryggingarskjalsnummar á ferðatryggingini (hetta sært tú á gula ferðatryggingarkortinum frá Trygd), títt persónnummar (p-tal), navn og telefonnummar hjá læknanum/sjúkrahúsinum á staðnum, sjúkuavgerð (diagnosu), navn á egnum lækna í Føroyum og møguliga adressu og telefonnummar hjá avvarðandi. Hetta ger, at tú fært skjótari hjálp.

**Fráboðan av skaða eftir heimkomu**
Tú kanst boða frá skaða við at senda eina skaðafráboðan til **Trygd**. Skaðafráboðanina fært tú við at ringja til **Trygd**, telefon (+298) 35 81 00, ella við at taka hana niður av heimasíðu okkara, **www.trygd.fo**

Skaðafráboðanin skal sendast til:

**P/F Trygd**
**Tryggingarfelag**
**Oknarvegur 5**
**Postboks 44**
**110 Tórshavn**

## Gerst tú sjúkur ella verður stolið frá tær ...

Í hesum brotinum sært tú, hvussu tú skalt bera teg at, um tú fært brúk fyri tíni ferðatrygging. Minst til at frágreiðingin her altíð skal metast saman við tryggingartreytunum.

**Hjálp á staðnum, læknavakt alt samdøgrið**
Á ferðini kanst tú seta teg í samband við læknar hjá **Trygd Emergency Centre** alt samdøgrið í sambandi við bæði álvarsliga og minni álvarsliga sjúku. Tú kanst fáa ráð og leiðbeining um læknaviðgerð, um útskrivaðan heilivág av viðgerandi lækna, umframt um egnaðar læknar og tannlæknar uttanlands. Tó fevnir ferðatryggingin ikki um útreiðslur í hesum sambandi.

**Sjúka ella skaði**
Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at tú letur **Trygd** skjalprógv fyri sjúkuavgerðini (diagnosuni) hjá viðgerðandi lækna á staðnum, og at læknin hjá **Trygd** fær atgongd til allar viðkomandi sjúkradagbøkur (journalar). Eftir heimkomu skal tú lata **Trygd** skjalprógv fyri útreiðslunum, tú hevur havt í sambandi við sjúkuna ella skaðan. **Trygd** letur síðani endurgjald vísandi til tryggingartreytirnar. Niðanfyri kanst tú lesa um, hvat tú skalt gera í sambandi við innlegging á sjúkrahús, læknaviðtalu ella viðtalu á skaðastovu. Um so er, at kostnaðurin av viðgerðini væntast at fara uppum kr. 5.000, skal tilburðurin fráboðast **Trygd Emergency Centre**.

**Viðtala á skaðastovu**
Er neyðugt hjá tær at fara á skaðastovu, skalt tú skjótast gjørligt seta teg í samband við **Trygd Emergency Centre**. Tá gjaldast skal kanst tú biðja skaðastovuna seta seg í samband við **Trygd**. Tú kanst eisini sjálvur gjalda fyri viðtaluna, og so fáa upphæddina endurrindaða frá **Trygd** við heimkomu. Skaðafráboðanin skal sendast til **Trygd** skjótast gjørligt, óansæð um **Trygd** ella tú sjálvur hevur goldið fyri viðtaluna. *Minst somuleiðis til at fáa neyðugt skjalprógv fyri skaðanum ella sjúkuni, tvs. læknaváttan við sjúkuavgerð (diagnosu), frágreiðing um møguligan fyriskipaðan heilivág, uppruna rokning og kvittan fyri gjaldi av viðtalu og heilivági.* Tá talan er um innlegging á sjúkrahús, sí niðanfyri.

**Innlegging á sjúkrahúsi**
Verður tú innlagdur á sjúkrahús, skalt tú seta teg í samband við **Trygd Emergency Centre** skjótast gjørligt og í seinasta lagi 1 samdøgur eftir innlegging. **Trygd Emergency Centre** tryggjar tær rætta viðgerð á líkinda støði. Um neyðugt, veitir **Trygd Emergency Centre** trygd fyri gjalding mótvegis viðgerandi sjúkrahúsinum.

**Viðgerð hjá lækna**
Um tú hevur verið til viðgerð hjá lækna, kanst tú biðja læknan seta seg í samband við **Trygd** við atliti til gjalding fyri viðtaluna. Tú kanst eisini sjálvur gjalda fyri viðtaluna, og so fáa upphæddina endurrindaða frá **Trygd** við heimkomu. Skaðafráboðan skal sendast til **Trygd** skjótast gjørligt, óansæð um **Trygd** ella tú sjálvur hevur goldið fyri viðtaluna. *Minst til at fáa neyðugt skjalprógv fyri skaðanum ella sjúkuni, tvs. læknaváttan við sjúkuavgerð (diagnosu), frágreiðing um møguligan fyriskipaðan heilivág, uppruna rokning og kvittan fyri gjaldi av viðtalu og heilivági.* Um so er, at kostnaðurin av viðgerðini væntast at fara uppum kr. 5.000, skal tilburðurin fráboðast **Trygd Emergency Centre**.

**Heimflutningur**
Kemur tað uppá tal, at tú skalt flytast heim, skalt tú beinanvegin seta teg í samband við **Trygd Emergency Centre**. Læknarnir her vilja so í samráð við viðgerðandi lækna/sjúkrahús meta um heimflutningur er neyðugur og ráðiligur.

**Boðsending og fylgi við sjúklingi**
Hevur tú, í sambandi við sjúku, brúk fyri at boð verða send eftir onkrum heimanífrá at koma til tín, skalt tú beinanvegin seta teg í samband við **Trygd Emergency Centre**. **Trygd Emergency Centre** skal somuleiðis fráboðast, um tú, í sambandi við sjúku ella deyða, hevur brúk fyri fylgdarfólki at koma við heim ella til viðgerðastaðið. *Tað er týdningarmikið, at tú fært neyðugt skjalprógv fyri skaðanum ella sjúkuni, tvs. læknaváttan við sjúkuavgerð (diagnosu), og at læknin hjá **Trygd** og/ella **Trygd Emergency Centre** fáa atgongd til allar viðkomandi sjúkradagbøkur (journalar).*

**Ferðaslit**
Um tú verður heimkallaður til Føroya, tí ein av tínum næstringum (sí tryggingartreytirnar grein 7.1) orsakað av brádligari sjúku ella skaða verður innlagdur á sjúkrahús ella doyr, skal tú beinanvegin seta teg í samband við **Trygd Emergency Centre. Trygd Emergency Centre** metir so um dekningur er fyri ferðini heim. Um so er, vil **Trygd Emergency Centre** skipa fyri heimferðini. Um tú, sambært avtalu við **Trygd Emergency Centre**, sjálvur skipar fyri heimferðini, skalt tú senda skaðafráboðan til **Trygd** skjótast gjørligt.

**Álop**
Verður tú álopin, skalt tú skjótast gjørligt boða frá til **Trygd Emergency Centre**. *Legg til merkis, at tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at álopið skjótast gjørligt verður meldað til løgregluna á staðnum, og at læknaváttan/frágreiðing frá skaðastovu og kvittan fyri fráboðan til løgregluna verður latin **Trygd**.*

**Privatábyrgd**
Tú mást ongantíð sjálvur viðurkenna endurgjaldsskyldu ella góðkenna eitt endurgjaldskrav. Støða til hetta skal altíð verða tikin av **Trygd**. Annars er vandi fyri at tú sjálvur mást rinda endurgjald, eisini fyri skaðahendingar, sum tú ikki kanst ábyrgdast fyri. Tú skal skjótast tilber boða **Trygd** frá, um tú kemur í støðu, ið kann metast at viðføra endurgjaldskrav mótvegis tær. Tað er týdningarmikið, at tú upplýsir **Trygd** um navn og bústað hjá skadda umframt møguligum vitnum.

**Rættarhjálp uttanlands**
Um tú hevur brúk fyri løgfrøðiligari hjálp ella trygdarveðhaldi, skal tú beinanvegin seta teg í samband við **Trygd**. Eitt møgulig trygdarveðhald skal rindast **Trygd** aftur, tá veðhaldið er loyst. Endalig avhending av trygdarveðhaldinum verður avgreitt, tá tú ert heimafturkomin.

**Endurgjald í sambandi við frítíðarferð**
Um tú ætlar at seta fram krav um endurgjald í sambandi við frítíðarferð orsakað av **sjúku**, **skaða** ella **heimflutningi**, mást tú fáa *skjalprógv* frá viðgerandi lækna um:

1. Hvørja sjúku tú hevur havt á ferðini,
2. Hvussu sjúkan skal handfarast (tvs. hvørji ráð tú hevur fingið frá læknanum)
3. Hvussu leingi tú hevur verið sjúkur á ferðini.

Tá tú ert komin heimaftur, skalt tú senda eina skaðafráboðan til **Trygd** saman við læknaváttanini og skjalprógvi fyri ferðakostnaðinum.

Verður krav sett fram um endurgjald orsakað av **ferðasliti** ella **deyða**, skal váttan fyri orsøkini til ferðaslitið ella deyðsváttan sendast **Trygd** saman við skaðafráboðanini.

**Seinkað viðføri**
Verður títt viðføri seinkað, skalt tú melda seinkingina til flogfelagið. Minst til at fáa eina váttan fyri tilmeldingini, eina sokallaða ***PIR*** (Property Irregularity Report). Tú skalt eisini, um møguligt, fáa eina váttan frá flogfelagnum, tá tú hevur fingið viðførið aftur. Tá tú kemur heimaftur, skalt tú senda eina skaðafráboðan til **Trygd** saman við **PIR**, flogferðaseðlum og viðførisfrámerkjum.
**Stuldur v.m.**
Í sambandi við stuldur, tá lutir hvørva, ella tá persónligir ognarlutir verða skaddir, er tað ein treyt fyri endurgjaldsskyldu hjá **Trygd**, at tilburðurin verður meldaður til løgregluna á staðnum. Er skaðin hendur, meðan lutirnir hava verið í varðveitslu hjá flutnings- ella flogferðslufelag, skalt tú skjótast gjørligt melda skaðan til felagið – minst til at fáa skjalprógv fyri tilmeldingini (**PIR** - Property Irregularity Report). Skaðafráboðan skal síðani skjótast gjørligt sendast til **Trygd**. Legg avrit av tilmeldingini til antin flutnings-/flogferðslufelagið ella til løgregluna við, umframt skjalprógv fyri virði og aldri á stolnu, horvnu ella skaddu lutunum. Skaddir lutir mugu ikki burturbeinast uttan góðkenning frá **Trygd**. **Trygd** kann krevja skaddu lutirnar inn í sambandi við skaðaviðgerðina. Innskrivað viðføri verður ikki mett at verða endaliga horvið, fyrr enn 30 dagar eftir, at tað átti at verði komið fram.

**Ferðaskjøl**
Í sambandi við stuldur og rán v.m. er tað ein treyt fyri endurgjaldi frá **Trygd**, at tilburðurin beinanvegin verður meldaður til løgregluna á staðnum. Viðførir tilburðurin ein bráðfeingis tørv ella trupulleikar, skalt tú beinanvegin seta teg í samband við **Trygd Emergency Centre**. Tá tú kemur heimaftur, skalt tú senda skaðafráboðan til **Trygd** saman við skjalprógvi fyri tilmelding til løgregluna og kostnaðinum av at útvega nýggj skjøl.

**Ov seint framkomin á ferðini uttanlands**
Verður tú ov seinur til ætlað flutningsfar, skalt tú skjótast gjørligt seta teg í samband við **Trygd Emergency Centre** og upplýsa, hvar tú hevur keypt ferðaseðilin. **Trygd Emergency Centre** vil so í samráð við ferðaskrivstovuna/flogfelagið veita tær ráðgeving og hjálpa tær við at finna annað flutningsfar.

**At koma upp í aftur skipað ferðalag**
Um so er, at tú fært brúk fyri hjálp til at koma upp í aftur skipaða ferðalagið, í sambandi við at tú verður ov seinur til ætlað flutningsfar, skal tú skjótast gjørligt seta teg í samband við **Trygd Emergency Centre.**

**Ferðin úr Føroyum ella til Føroya seinkað**
Verður tín fráferð úr, ella heimkoma til, Føroya seinkað meira enn 8 tímar, skalt tú, tá tú ert komin heim, senda eina skaðafráboðan saman við skjalprógvi frá flutningsfelagnum um seinkingina. Á skjalprógvinum skal verða tilskilað, ávíkavist nær tú skuldi verið farin avstað, og nær tú fór avstað, ella nær tú skuldi verið komin heim, og nær tú komst heim.

**Frítíðaríbúðartrygging**
Er ikki búgvandi í frítíðaríbúðini orsakað av skaða, skalt tú seta teg í samband við **Trygd Emergency Centre**, sum í samráð við teg, ella ferðaskrivstovu tína, vil hjálpa tær at finna aðra hóskandi frítíðaríbúð.

**Evakuering**
Ert tú staddur í umráði, sum tað er neyðugt at evakuera frá, skalt tú seta teg í samband við **Trygd Emergency Centre**, sum vil standa fyri evakueringini – møguliga í samráð við almennu myndugleikarnar. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við **Trygd Emergency Centre**, um tú ivast í, um evakuering er neyðug.

**Leiting og bjarging**
Er tað neyðugt at seta leiting ella bjarging í verk, skulu almennu myndugleikarnir á staðnum fráboðast fyrst. Síðani skal **Trygd Emergency Centre** fráboðast skjótast gjørligt.
**Trygd Emergency Centre** vil so seta neyðug tiltøk í verk, møguliga í samráð við lokalu og almennu myndugleikarnar.
**Leigubilur undan fráferð**
Fær tín bilur ein skrokkskaða beint undan fráferð, og merkir hetta, at tú sostatt ikki kanst fara ætlaðu bilferðina, skalt tú skjótast gjørligt seta teg í samband við **Trygd,** sum so vil hjálpa tær við leigu av øðrum bili. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at skrokktrygging er teknað fyri bilin, og bilurin fær skaða, ið er umfataður av tryggingini.

**Heimflutningur av egnum bili**
Er ikki møguligt at koyra bilin heimaftur orsakað av ferðasliti, skalt tú skjótast gjørligt seta teg í samband við **Trygd Emergency Centre**, sum vil hjálpa tær við heimflutningi av bilinum.

**Sjálvsábyrgd í sambandi við leigu av motorakfari uttanlands**
Tú skalt senda løgreglufrágreiðing ella annað skjalprógv fyri fráboðan av skaðanum, umframt kvittanir, skaðauppgerð frá tryggingarfelagnum hjá útleigingarfyritøkuni og aðrar upplýsingar, ið kunnu lýsa málið.

# III Leiðbeining til læknar og sjúkrahús á enskum, týskum, sponskum og fronskum

## Enskt:

**Instructions to doctors and/or hospitals**
The bearer of this Trygd Travel Insurance Policy is covered against hospital and medical expenses up to the amounts insured, as mentioned in these policy conditions.

The cover relates to expenses resulting from accidents occurring to the bearer during the period of Insurance and/or unforeseen illnesses, which arise during that period.

Should you wish to consult us regarding treatment of the Insured and/or policy matters, please do not hesitate to contact our 24-hour Emergency Assistance Company:

**Worldwide**
Tel.: (+45) 44 25 81 00
Fax: (+45) 33 15 60 61
E-mail: trygd@trygd.fo

Bills and indemnifications forms should be forwarded to Trygd Insurance Company in The Faroe Islands:

**P/F Trygd**
Tryggingarfelag
Oknarvegur 5
Postbox 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Please indicate on the bills the manner in which payment should be made.

On behalf of the persons insured by this insurance policy and Trygd Insurance Company, we hereby thank you for your anticipated co-operation.

## Týskt:

**Hinweise für den Artz und/oder die Krankenhausverwaltung**
Der Inhaber dieses Trygd-Versicherungsscheins ist für Krankenhauskosten und ärztliche Kosten bis zur Höhe des in der Police angegebenen Versicherungsbetrages versichert.

Die Erstattung bezieht sich auf unbedingt notwendige Kosten, die innerhalb des Versicherungszeitraumes durch Unfälle und/oder unvorgesehene Krankheiten des Versicherten entstanden sind.

Wenn Sie Fragen haben bezüglich der Versicherungsbedingungen und/oder der Behandlung des Versicherten bzw. des Versicherungsfalles, zögern Sie dann nicht, Kontakt mit unserer Notrufzentrale aufzunehmen. Diese Notrufzentrale ist Tag und Nacht dienstbereit.

**Weltweit**
Tel.: (+45) 44 25 81 00
Fax: (+45) 33 15 60 61
E-Mail: trygd@trygd.fo

Rechnungen und Erstattungsanträge müssen Sie an Trygd Tryggingarfelag schicken:

**P/F Trygd**
Tryggingarfelag
Oknarvegur 5
Postbox 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Bitte geben Sie an, in welcher Form Sie die Begleichung der Rechnung wünschen. Im Namen von Trygd Tryggingarfelag und des Versicherten danken wir Ihnen für Ihre Mithilfe.

## Spanskt

**Instrucciones para médicos y/o hospitales**
El titular de este certificado de seguro de Trygd está cubierto de gastos médicos y de hospital hasta las cantidades aseguradas como mencionadas en esta póliza.

La cobertura corresponde a gastos estrictamente necesarios y consecuencia de accidentes ocurridos durante el período de seguro o por enfermedades imprevistas que comiencen durante este período.

Si desea consultarnos acerca del tratamiento del asegurado y/o por preguntas referidas a la póliza no dude en llamar a la compañía de asistencia de emergencia operativa 24 horas al día:

**En todo el Mundo**
Teléfono: (+45) 44 25 81 00
Telefax: (+45) 33 15 60 61
Correo electrónico: trygd@trygd.fo

Las facturas y los formularios de indemnización deberán ser enviados a Trygd, una compañía de seguros in las Islas Feroe:

**P/F Trygd**
Compañía de seguros
Oknarvegur 5
Postbox 44
FO-110 Tórshavn
Las Islas Feroe

Le rogamos que indique en sus facturas la forma de pago deseada.

En nombre de los titulares de este seguro y de la compañía de seguro Trygd deseamos agradecerle anticipadamente su colaboración.

## Franskt:

**Instructions pour médecins et/ou hopitaux**

Le titulaire de cette police d'assurance Trygd est couvert pour les frais médicaux et frais d'hospitalisation, jusqu'aux les montants assurés indiqués dans la police.

Il est important de noter qu'il n'y a indemnisation que lorsque les frais de traitement sont consécutifs à une maladie contractée ou à un accident encouru durant la période de validité de l'assurance et présentent un caractère strictement urgent.

Dans le cas où vous voudriez nous consulter sur le traitement de l'assurè et/ou les conditions d'assurance, vous pourriez contacter notre organisation d'assistance d'urgence, opérant 24 heures sur 24.

**Dans le monde entier**
Téléphone: (+45) 44 25 81 00
Télécopie: (+45) 33 15 60 61
Courrier électronique : trygd@trygd.fo

Les factures et la demande de remboursement doivent être envoyées à Trygd Tryggingarfelag:

**P/F Trygd**
Tryggingarfelag
Oknarvegur 5
Postbox 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Veuillez vous indiquer le mode de paiement que nous devions employer pour le règlement des factures. Au nom des personnes qui ont souscrit cette assurance, nous vous remercions d'avance de votre coopération.

sendistovan

**P/F Trygd**
**Tryggingarfelag**

Oknarvegur 5
P.O. Box 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 358 100
Fax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Trygd hugsar um teg